FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2022

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.lms.fo

# RØÐA LØGMANS

Harra formaður! Góðu føroyingar!

Gróður og fleyr av útsuðri,
sól gyllir landið so blíð.
Vón fyri avburðar skurði
tykist at vera í tí.
Grøsini grøn,
blomstrini vøn
landið í summarskrúð klæða.

Soleiðis yrkir Ismar Joensen úr Fuglafirði um føroyska hásummarið, nú vøksturin er sum mestur. Grasið er sítt, eplaslokkarnir djúpgrønir, og blómur klæða landið í summarskrúð.

Henda vakra summarmyndin kann eisini nýtast til at lýsa Føroyar í dag. Tað grør um gangandi fót – og vøksturin er eyðsýndur allastaðni.

Men nakrar hóttanir eru tó. Í náttúruni eru tað serliga stormur, seyður og svartaspilla, sum kunnu forpurra okkum grøðina. Men virka vit, skapa vit lívd, tryggja vit, at garðarnir eru í seyðahøgum standi, og velta vit upp úr nýggjum, so kunnu vit verja vøksturin.

Í løtuni eru eisini nakrar politiskar hóttanir. Kríggj í Evropa, inflatión og matvøru- og orkukreppa. Men virka vit, skapa vit lívd, har neyðugt er, tryggja vit bøgarðarnar, og hava vit dirvi til javnan at velta upp úr nýggjum, kunnu vit verja vøksturin.

Vit njóta nú ljósa summarið. Men vit vita, at tað spakuliga er farið at myrkna. Á ólavsøku er aftur fríggingarmyrkt. Vit hoyggja, heysta og fylla goymslurnar, tí vit kenna ringrásina. Eftir ljósar tíðir koma myrkari tíðir – og so lýsnar aftur. Soleiðis er í náttúruni eins væl og í samfelagsbúskapinum.

Við ongari fyrireiking kann veturin gerast tungur. Men fyrireika vit okkum við skili, nýtist okkum ikki at stúra. So eru vit trygg.

***

Harra formaður!

Í hesum døgum eru nógv, sum stúra. Sum eru ótrygg. Eitt nú í Ukraina, har 10 milliónir eru flýggjað frá húsi og heimi.

Orð kunnu ikki lýsa tað, sum hendir har nú. Hetta er álvarsamasta støðan í Evropa síðani seinna veraldarbardaga.

Føroyar fordøma russisku innrásina og kríggið í Ukraina. Tí hava vit sett tiltøk í verk, sum eru við til at leggja trýst á Russland.

Vit noyðast nú at geva til kennar, hvar vit standa trygdarpolitiskt – og ikki minst moralskt.

Tí eiga vit politikarar at viðgera neyvt, hvørja støðu vit skulu taka, tá ið um Russland ræður. Eisini frameftir. Hetta er ikki eitt samgongu – ella andstøðumál. Øll politiska skipanin má standa saman. Eins og vit stóðu saman um at lata samfelagið upp fyri flóttafólki.

Umleið hálvthundrað ukrainar liva nú trygt innan føroysku garðarnar. Tey hava møtt føroyskum hjálpsemi og gestablídni. Tey hava fingið bústað og eru farin til arbeiðis og í skúla.

Millum teirra eru Tatsiana og Vitalii Turbin – og børn teirra, tvey ára gamli Mykhailo og átta ára gamla Anastasiia.

Tá ið Russland gjørdi innrás, var ikki verandi í íbúðini á 6. hædd. Tey funnu skjól í einum myrkum kjallara hjá familju, meðan rakettir og bumbur løgdu landið í oyði.

Tey gjørdu av at taka til rýmingar. Hóast tað var torført at fara, vildu tey fáa børnini burtur úr lívsvanda. Í fimm dagar flýggjaðu tey gjøgnum krígsherjaða landið og máttu sova í bilinum.

Nú eru tey her.

Enn stúra tey. Um heimlandið, familju og vinir. Men í Føroyum eru børnini trygg. Hvørki ávaringarlúðrar, bumbur ella rakettálop fáa tey at óttast fyri lívinum.

"Landið her er kalt," sigur Tatsiana, "men fólkini eru heit."

Avgerðin um at taka ímóti flóttafólki úr Ukraina er ein varði í politisku søgu okkara. Tað hevur kravt nógvar fyrireikingar.

Samstarvið millum stovnar, felagsskapir og politisku flokkarnar hevur verið framúr. Og føroyingar hava tikið væl ímóti.

***

Tí føroyingar lata fegnir neyðstøddum burtur av. Vit hava leingi havt góðar tíðir. Gróðurin hevur ikki trotið, og ávøksturin hevur verið fleiri fold.

Við støðuga búskaparvøkstrinum hava vit betrað um vælferðina. Tað sæst aftur í fólkatalinum, sum nú hevur rundað 54.000.

Men, harra formaður! Góða gongdin heldur ikki fram av sær sjálvari. Hann boðar nú frá búskaparligum ruskveðri, og fyrstu tekin um eina heimsumfatandi orku- og matvørukreppu hómast. Vit merkja inflatiónina. Serliga brennievni og matvørur dýrka – og rentan hækkar.

Hetta rakar húsarhaldini, og tí fer landsstýrið at leggja fram uppskot um at hjálpa sperdum húskjum, so at tey, ið eru ringast fyri fíggjarliga, kunnu fáa upp til 7000 krónur.

Men hóast tað myrknar, kunnu vit vera bjartskygd. Vaksandi fólkatalið gevur fleiri høvd og fleiri hendur til arbeiðsmarknaðin – og tað er gott fyri búskapin.

Arbeiðsloysið er metlágt, og arbeiðsfjøldin er millum heimsins best útbúnu og virknastu. Vit hava methøgan útflutning í ár, og tilfeingisgjaldið frá ali- og fiskivinnuni setti met í fjør. Skuldin hjá landi, kommunum, almennum og privatum er lítil, sammett við onnur lond.

Í 2021 var avlopið í landskassanum 138 mió. kr., og í ár eru inntøkurnar methøgar.

***

Men hóast vónin er bjørt um góðan avburðarskurð, má tað ikki gerast okkum eitt ból. Tvørturímóti. Vit mugu áhaldandi virka fyri, at samfelagið mennist.

Vit skulu tora at leggja um og velta bøin av nýggjum. At bjóða vanahugsanini av og laga okkum til nýggjar umstøður og avbjóðingar.

Hetta var endamálið við Vakstrarforumi. At finna ítøkilig átøk, sum kunnu skapa burðardyggan vøkstur og langtíðartryggja vælferðina. Í juni fingu vit 164 tilmæli á seks økjum: Grøna skiftinum, havinum, útbúgving og arbeiðsmarknaði, KT, vinnuferðavinnu og maritimari veitaravinnu.

Málini eru framsøkin og djørv.

Útflutningurin úr sjónum skal vaksa við trimum milliardum, og KT-vinnan skal vaksa úr 2,5 upp í 6 prosent av búskapinum.

Vinnuferðavinnan skal vaksa, so vit fáa eina javna og skynsama ferðavinnu alt árið.

Føroyskar havnir og veitarar skulu vera fyrsta valið hjá skipum í Norðuratlantshavi.

Á útbúgvingarøkinum skulu vit møta arbeiðsmarknaðinum og búgva okkum til framtíðar førleikakrøv.

Mest av øllum mugu vit gerast grønari. Eitt nú minka munandi um útlátið, minka um tilfarið, vit brúka – og gagnnýta og varðveita føroyska lendið og sjóøkið betur.

Tað er mín áheitan, at vit øll í felag fara at arbeiða við átøkunum.

Tí, harra formaður! Arbeiða vit ikki burðardygt, er tað sum at sleppa seyðinum inn á bøin nú. Hann bítur fegin góða grasið – men hevur so einki at eta í vetur.

Vit mugu virka langskygt, og nýggi orku- og veðurlagspolitikkurin er eitt stórt grønt fet.

Tað gongur væl at skifta til grøna elframleiðslu, og skjótt fáa vit orku frá tveimum nýggjum vindmyllu-lundum oman fyri Havnina.

Meiri ferð verður sett á royndirnar við sjóvarfalsorku, og vit kanna, um orka fæst úr heitum keldum undir jørð.

Landið skal eisini nýta grønar loysnir. Tí fara bygningarnir í Tinganesi skjótt at verða hitaðir við sjógvi.

Vit mugu somuleiðis minka um útlátið.

Frá 2024 banna vit oljufýrum í nýggjum húsum, vit veita stuðul til at taka niður gamlar oljufýringar, og hitapumpur sleppa framhaldandi undan meirvirðisgjaldi. Eisini leingja vit skipanina við mvg-afturbering til el-og vetnisbilar, og vit minka stigvíst um ávís dálkandi vakstrarhúsgass.

Við nýggju pantskipanini kunnu vit lata øll pantíløt inn aftur á sama stað. Hartil eiga vit at taka pant av fleiri íløtum, so vit minka um burturkastið.

Men tað nyttar lítið at hugsa um heimsins náttúruavbjóðingar og samstundis gloyma okkara egnu. Vit hava avmarkaða vídd, og vit mugu tí hava greiðir ætlanir.

Bæði um hvussu ymsu økini í landinum skulu kunna brúkast, og hvussu vit skipa gongd í haga.

Føroyingar skulu kunna njóta náttúruna. Tað hevur altíð verið siðvenja.

Skiljast skal tí millum privata- og vinnuliga gongd í haga. Og vit skulu altíð sýna varsemi og atlit til landbúnað, seyðahald og náttúru.

***

Vit hava jú skyldu til at varðveita náttúruna og fáa sum mest burtur úr tilfeinginum.

Tí eiga vit í størri mun at menna føroyskar landbúnaðarúrdráttir. Ein landbúnaðarpolitikkur skal orðast, har dentur skal leggjast á burðardygt lendisbrúk, djóravælferð, útbúgving og fígging.

Tilfeingið úr sjónum kann somuleiðis gagnnýtast betur, so vit fáa meira burturúr. Føroyar eru heimsins kovi, og eftirspurningurin eftir fiskavørum bara økist.

Semja má fáast millum strandalondini, so vit tryggja burðardygga veiðu.

Nú fiskivinnan hevur fingið tryggar karmar, verða stórar íløgur gjørdar í skip, ið bæði eru grønari og effektivari. Royndarkvotur eru latnar til fleiri nýggj fiskasløg.

Alivinnan stendur fyri meir enn helvtini av útflutninginum og ger stórar íløgur fyri at betra um framleiðslu, tøkni og burðardygd, fyri at tryggja kappingarførið. Alivinnan skal framhaldandi kunna virka og vaksa á tryggum grundarlagi.

Laksaprísurin hevur verið óvanliga høgur seinastu tíðina. Framleiðslukostnaðurin er eisini hækkaður, orsakað av hækkandi rávøruprísum. Ætlanin er tí at tillaga tøkugjaldið, so tað avspeglar nýggja veruleikan.

***

Men hóast náttúrutilfeingið er ríkt, er menniskjaliga tilfeingið tað týdningarmesta. Eitt tað dýrasta, menniskjan er signað við, eru evnini at læra. Útbúgving er ein av fortreytunum fyri burðardyggum vøkstri í øllum geirum.

Fjølbroytnið av útbúgvingum í Føroyum økist støðugt.

Á Setrinum verða fleiri tikin inn til KT-bachelor, og nýggj master í KT-verkfrøði byrjar í ár. Ein yrkisútbúgving í KT-support verður nú fyrireikað.

Nú ber eisini til at taka master-útbúgving í lóg á setrinum.

Setrið tekur nú inn til sjúkrarøktarfrøði tvær ferðir um árið, og heilsuútbúgvingarnar í Hovi eru dagførdar. Hartil byrja námsfrøðilesandi tvær ferðir árliga frá komandi ári.

Á miðnámi dagføra vit fleiri yrkisligar útbúgvingar, og í august sleppa tey fyrstu inn á nýggju alaraútbúgvingina.

Húsarhaldsskúlin í Klaksvík fær nýggjar og betri umstøður.

Í komandi ári dagføra vit fólkaskúlalógina og endurskoða tíma- og lærugreinabýtið, umframt lutfallið millum ymsu lærugreinarnar.

Hugt verður at floksstøddum, hvussu skúladagurin kann styttast, og hvussu vit betur kunnu skipa føroyskt sum annaðmál.

***

Harra formaður! Í hesi gróðrarmiklu summartíð er altíð onkur vøkstur, sum ikki trívist. Tí lendið er ov vátt ella ov turt. Tí sólin er ov sterk ella skuggin ov dimmur.

Hóast tíðirnar eru góðar, er talið av ungum, sum mistrívast, vaksandi. Tað gera vit nakað við. Í Føroyum skal vera trygt – serliga hjá børnum og ungum.

Tað skal gerast støðugt skjótari at sleppa til útgreiningar og viðgerðar í barna- og ungdómspsykiatriini – og ung við angist og tunglyndi skulu framhaldandi fáa ókeypis sálarfrøðiliga hjálp. Tørvurin hevur verið stórur.

Vit eftimeta royndarskipanina við sálarfrøðingi í fólkaskúlanum og taka støðu til, hvussu hetta skal skipast frameftir.

Smuglarar og seljarar skulu ikki við rúsevnum køva ungdómin, beint sum hann fer at spíra. Nýggja heildarætlanin við tilmælum um, hvussu vit kunnu koma rúsevnismisnýtsluni til lívs, staðfestir, at trivnaður er besta amboðið.

Tey, sum eru partur av einum góðum felagsskapi, fáa sjáldnari trupulleikar av rúsevnum. Tí hava ítróttar- og mentanarlív, kirkjur, samkomur og aðrir góðir felagsskapir ein lyklaleiklut í felags arbeiðinum at lúka hetta óynskta illgrasið burtur.

Komandi tingár velta vit upp úr nýggjum fyri at basa rúsevnum – bæði við at hjálpa teimum ungu og við at gera tað torførari at smugla.

Og nú vit tosa um lógarbrot, so hava vit dagført revsilógina. Eitt nú er staðfest, at er samtykki ikki givið, er talan um neyðtøku.

Fongsulviðurskiftini hava ikki verið nøktandi. Eg fegnist um at avtala er gjørd við donsku stjórnina um at byggja nýtt fongsul, og loksins eru fyrireikingarnar byrjaðar. Hartil kemur ein skipan við fótleinkjum.

***

Harra formaður! Eitt annað ørindi hjá Ismari Joensen ljóðar soleiðis:

Smæra og rølikur kýtast
við annan vøkstur úr mold,
ikki man smáblómum nýtast
smæða seg burtur á fold.
Vøkur hvør sær,
angandi tær
lendið við litum upp skrýða.

Føroyska fjølbroytnið er stórt, og vit skulu laga viðurskiftini, so at allur vøkstur trívist her. Eingin smáblóma skal smæðast burtur í Føroyum – tvørturímóti. Vit betra tí um tryggleikan og trivnaðin á fleiri mótum.

Eitt brekumboð fer at hava eftirlit við, um breksáttmálin verður fylgdur. Harumframt skal umboðið upplýsa fólk, sum hava brek, um teirra rættindi. Hetta verður ein kærkomin skipan.

Útlendingar, sum koma til Føroya, fáa tryggar karmar um síni rættindi og skyldur í nýggju integratións-lógini. Varandi uppihaldsloyvi verður frameftir treytað av, um tey standa skeið í føroyskum sum annaðmál.

Fyrstu árini hjá børnum hava avgerandi týdning fyri teirra framtíð. Tí skulu vit eisini tryggja børnum undir skúlaaldri bestu umstøður til at læra og búnast.

Námsfrøðiútbúgvingin verður umskipað og dagførd, so at námsfrøðingar verða útbúnir beinleiðis til dagstovnaøkið.

Barsilsfarloyvið er longt til 52 vikur, og nú raðfesta vit at hækka barsilsútgjaldið.

Foreldur, sum vilja tað, skulu kunna ansa børnunum heima. Tí skulu pengarnir fylgja barninum.

Barnaverndarlógin skal dagførast til frama fyri okkara smæstu.

Tá ið um mentan og ítrótt ræður síggja vit, hvussu okkara kýtast við onnur og vinna. Tí hava heldur ikki ítrótta- og listafólk nakra orsøk at smæða seg burtur. Tvørturímóti.

Góðu úrslitini innan ítróttin eru heilt ótrúlig, hugsa vit um fólkatalið. Og góð úrslit krevja góðar karmar. Tí gleðir tað meg, at allir politisku flokkarnir eru samdir um at fíggja ein part av nýggju stórhøllini.

Føroyska listin er somuleiðis ófatiliga dygdargóð. Serliga í filmsvinnuni er vøkstur, og nógvir stuttfilmir hava vunnið altjóða virðislønir kring heimin. Filmiskt spenna Føroyar nú frá James Bond til fólkakæra Hannis Martinsson í Trom.

Á listaliga økinum skapa vit eisini karmar. Arkitektakappingin um Tjóðleikhúsið er í gongd, og í heyst kemur uppskot um at útvega tí uttanhýsis fígging. Eisini kemur uppskot um, at list skal vera ein sjálvsagdur partur av almennari bygging.

***

Og harra formaður! – Enn er tørvur á at byggja. Serliga til bústaðir. Fyri trivnaðin hevur tað alt at siga, at vit hava eitt trygt stað at festa røtur. Spyrjið bara ukrainsku Tatsianu og Vitalii Turbin.

Fyri tey, sum mangla eitt trygt heim, er tað avgerandi, at bústaðartrupulleikin verður loystur. Og vit eru væl á veg.

Seinastu trý árini eru fleiri enn 550 búeindir lagdar aftur at marknaðinum.

Hetta til komandi ár byggja Bústaðir 100 búeindir afturat, og heilt nógv verður bygt privat.

Eg viðurkenni, at fólk við serligum avbjóðingum hava verið í svárari bústaðarneyð. Men vit byggja vardar bústaðir á Argjum og í Hoyvík. Samanlagt verða 48 nýggj bú- og umlættingarpláss.

Á “Skálagarði” í Klaksvík - sum letur upp komandi ár – verður pláss fyri 15 fólkum við seinheilaskaða.

Arbeiðið at byggja stovnar og sambýli til fólk við serligum tørvi heldur støðugt fram. Millum annað fara vit í næsta ár undir at byggja eitt sambýli til vaksin við autismu.

Harumframt hava Bústaðir fingið 200 mió kr. til serligar málbólkar. Í samstarvi við Almannaverkið og Sinnisbata verða 12 íbúðir í Blómubrekku í Havn.

Fyri at óneyðugir steðgir ikki koma í almennu byggingina, arbeiða vit við eini langtíðarætlan um, hvørjir bústovnar, virknistilboð og umlættingartilboð skulu byggjast komandi 10 til 15 árini. Hetta mugu allir flokkar samstarva um.

***

Somuleiðis mugu allir flokkar samstarva um heilsuverkið – við langskygdum loysnum. Øll skulu kenna seg trygg og líta á heilsuverkið. Vit hava vatnað heilsuøkið væl við metnógvari orku og fígging, so tænasturnar kunnu fylgja við nútíðini.

Málið er viðgerðartrygd, so eingin skal bíða óneyðuga leingi eftir kanningum ella viðgerð. Bíðilistarnir skulu greinast regluliga, so vit skjótt síggja, hví teir leingjast – og hvussu vit stytta teir aftur.

Serlæknar eru settir, játtanin til konsulentar er økt, og virksemið er betur samskipað millum sjúkrahúsini. Bíðitíðin til MR-skannaran er seinastu tvey árini stytt úr seks vikum niður í tvær, og seinni í ár keypa vit enn ein CT-skannara.

Nýggja krabbameinsætlanin verður nú sett í verk, so at øll fáa lógartryggjaða viðgerðartrygd.

Ein nýggj neyðtøkumóttøka á Landssjúkrahúsinum tryggjar ofrunum skjóta hjálp; og nú skipa vit eisini eina sálarliga bráðmóttøku.

Á nýggjárinum byrjar Fólkaheilsustýrið, sum skal tryggja yvirskipaðu heilsufakligu stýringina.

Og komandi ár taka vit H-bygningin á Landssjúkrahúsinum í nýtslu. Tøkniliga verður hetta eitt skarvslop, og umstøðurnar hjá sjúklingum og starvsfólki verða munandi bøttar. Likamlig og sálarlig viðgerð fara tá at hava somu inngongd.

Eisini byrjar samstarvið ímillum Novo Nordisk grunnin og Heilsumálaráðið, sum skal betra diabetes-viðgerðina og granskingina á økinum.

Endurvenjingar til teirra, sum hava mist førleikar av sjúku ella skaða, verða eisini raðfestar. Bara í ár verða seks nýggj størv sett til endurvenjing.

Og í næstum verður lógaruppskot lagt fram um at yvirtaka farsóttarøkið.

***

Harra formaður!

Fyri at tryggja trivnað, fjølbroytni og vøkstur í øllum landinum mugu vit støðugt útbyggja infrakervið.

Vit seta sjøtul á arbeiðið at gera tunnil til Suðuroyar og stovna partafelagið Suðuroyartunnil. Frá 2025 seta vit 100 mió. kr. av um árið til verkætlanina.

Eisini fyrireika vit ein vestmannatunnil, og arbeiðið við tunli millum Øravík og Fámjin er byrjað.

Arbeiðini við tunlunum til Sandoynna, Dals og Norður um Fjall ganga eftir ætlan.

Eysturoyartunnilin hevur kollvelt samferðsluna, og prísurin er nú tillagaður, so at tey, sum koyra ofta, fáa størri nyttu av tunlinum.

Strandfaraskip Landsins knýta landið saman og hava alstóran týdning fyri samferðsluna. Men Strand-ferðslan má umskipast, so hon fær tryggar og varandi karmar og ferjuflotin kann endurnýggjast.

Seinnu árini hevur suðuroyarleiðin verið undir trýsti. Økta virksemið í oynni ávirkar farmaflutningin. Vit leiga tí ferjuna Herjolf III, ið fyrst og fremst skal sigla sum farmaskip. Soleiðis fáa bæði suðuroy-ingar og vinnan betri tænastu.

***

Harra formaður!

Sum eg nevndi í byrjanini, hómast nú hóttanir, sum kunnu ávirka okkara vøkstur. Vit noyðast at virka fyri at tryggja okkum, at ávirkanin verður so lítil sum gjørligt.

Kríggið í Ukraina ávirkar milliónir av fólki beinleiðis. Eitt nú Tatsianu og Vitalii Turbin – og børn teirra. Men tað ávirkar enn fleiri óbeinleiðis.

Í tí smáa eru stórt sæð allar vørur vorðnar dýrari – og í tí stóra er altjóða politiska støðan fullkomiliga kollvelt.

Tað krevur ein búnari og virknari verjupolitiskan leiklut, nú vit hava fingið størri ávirkan enn nakrantíð áður.

Lofteftirlitsradarin, sum landsstýrið og danska stjórnin gjørdu avtalu um í juni, tryggjar, at fremmand flogfør ikki kunnu flúgva ósædd í føroyskum loftrúmi. Hetta hevur týdning fyri NATO-verjuna og tryggleika føroyinga.

Samstarvið við donsku verjumyndugleikarnar er økt, og samskiftið við NATO, USA, Bretland, Noreg og Ísland um verjupolitisk viðurskifti er í menning.

Tað eru nýggjar tíðir í ríkisfelagsskapinum. Vit skulu framhaldandi modernisera felagsskapin – gagnnýta sínámillum møguleikar og beina burtur markaforðingar.

Nýggja samstarvsráðið, sum hittist her í juni, er eitt nýbrot. Nú eru vit við í tí, sum hevur týdning fyri trygd og verju í Norðuratlantshavi og í Arktis.

Tí mugu vit gera okkum greitt, hvat vit vilja trygdarpolitiskt. Uppskot til samtyktar um trygdarpolitisku mál Føroya verður lagt fyri Løgtingið í november.

Eisini verður ein ætlan um cybertrygd løgd fram við árslok.

***

Tí vit síggja nú av álvara, hvussu vit ávirkast hvør av øðrum. Tað, sum verður sátt aðrastaðni, grør brátt hjá okkum við. Tí arbeiða vit fyri samstarvi og avtalum við fleiri lond. Vit mugu støðugt fáa vinnulívinum nýggjar útflutningsmøguleikar.

Í apríl samdust Føroyar og Japan um ein formligan karm um samstarv. Vit vilja hava eina fríhandilsskipan. Sendistovan í Tel Aviv hevur virkað í hálvtannað ár, og útflutningurin til Ísraels er í stórari menning. Arbeitt verður nú við at lata upp sendistovu í Washington.

Seinastu tíðina hevur sera jaligt samskifti verið millum løgmann og ES-nevndarforkvinnuna. ES tykist nú veruliga sinnað at styrkja viðurskiftini við Føroyar, eisini á handilsøkinum.

Og fyri at skapa enn betri gróðrarlíkindi fyri útflutningi fara vit at stovna "Export Faroe Islands", ið skal hava ábyrgd av at menna útflutning, eins og "Visit Faroe Islands" mennir ferðavinnuna.

***

Harra formaður! Góðu føroyingar.

Málið fyri hetta komandi árið verður at velta upp úr nýggjum og sáa nýtt. Men eisini at verja vøksturin og skapa lívd, har neyðugt er. Tryggja, at garðar okkara eru í seyðahøgum standi, nú hóttanir hómast.

Føroyska samfelagið stendur í fagrasta blóma, og vit hava hetta farna árið sett met á nógvum ymsum parametrum. Tað gongur ómetaliga væl.

Men eygleiða vit heimin, síggja vit, at tað spakuliga er farið at myrkna. Tað ber boð um, at summarið fer at halla. Men virka vit rætt nú, kunnu vit tryggja okkum, at nýggja árstíðin ikki tekur okkum á bóli.

Kring landið eru fólk nú í hoyna. Eisini tey fyrireika seg til dimmari tíðir. Einki hoyfólk stúrir tó fyri vetrinum, tí tey vita sum er: soleiðis er ringrásin, og bera tey seg skilagott at nú, strekkir summarvøksturin til – eisini tá ið ruskveðrið kemur.

Politiskt er støðan tann sama. Fyrireika vit okkum við skili, nýtist okkum ikki at stúra.

So eru vit framhaldandi trygg.

Eg skal enda við einum so hóskandi broti úr yrkingini MYND 1 úr savninum »Eg skrivi á vátt pappír« eftir Lív Mariu Róadóttir Jæger.

»Enn eru dagarnir ljósir
langir

Ljósið fer at broytast komandi tíðina
við blíðari vissu
blíð
tí tað fer ikki at skaka nakran at tað hendir«

Góða ólavsøku, øll somul!

Gud signi Føroyar.

Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNAR- OG LÓGARMÁL

### Broytingar í stýrisskipanarlógini

Arbeiðið við at endurskoða stýrisskipanarlógina varð umrøtt í seinastu løgmansrøðu. Framhaldandi verður arbeitt við uppskotinum. Fleiri fundir hava verið við floksformenninar um málið, og í heyst ætlar løgmaður at kalla floksformenninar á fund fyri endaliga at fá greiðu á, hvussu eitt møguligt broytingaruppskot til lógina skal orðast.

Umframt heitini á løgtings- og landsstýrismonnum hevur serliga verið hugsað um fíggjarmálsviðurskifti, millumtjóðaviðurskifti, uppgávubýti millum løgtingsumboðsmannin og landsstýrismálanevndina, kunning av uttanlandsnevndini, valrætt til ómyndiggjørd, kommunuviðurskifti og um rættarliga og politiska ábyrgd av teim málum, sum løgd eru til sjálvstøðugar nevndir, ið taka endaligar avgerðir.

### Vakstrarforum

Vakstrarforum varð sett á stovn í februar 2021 og endaði sítt arbeiði í juni 2022. Endamálið við Vakstrarforum hevur verið at birta upp undir virðisøking í týdningarmiklum geirum, siðbundnum vinnum og alternativum framtíðarvinnum í Føroyum á burðardyggari grund. Í Vakstrarforum hava sitið fólk við servitan úr ymiskum vinnugreinum, arbeiðsmarknaði, gransking, íverksetan, orku, burðardygd og øðrum.

Undir Vakstrarforum hava verið seks arbeiðsbólkar fyri hesi øki: havið, KT, vinnuferðavinnu, maritimu veitaravinnuna, útbúgving og arbeiðsmarknað og grøna skiftið. Hesir seks bólkar hava latið úr hondum hvør sína frágreiðing við í alt 164 ymiskum tilmælum. Umframt tilmælini hava teir seks arbeiðsbólkarnir orðað nøkur djørv og framsøkin mál:

- Vit skulu fremja eitt grønt skifti í breiðastu merking, sum ber í sær minking í útláti og tilfarsnýtslu og eina fyriskipan um, hvussu vit kunnu gagnnýta og varðveita føroyskt lendi og sjóøki betur enn í dag
- Útflutningurin úr havinum skal økjast við 3 milliardum
- KT-vinnan skal vaksa úr 2,5 % upp í 6 % av BTÚ
- Vinnuferðavinnan skal trífaldast, soleiðis at ferðavinnan sum heild fær betri avkast uttanfyri summarsesong
- Føroyar og føroyskar havnir og føroyskir veitarar skulu vera fyrsta valið hjá skipum í Norðuratlantshavi
- Á útbúgvingarøkinum skulu vit møta førleikatørvinum á framtíðar arbeiðsmarknaðinum og búgva føroyska samfelagið til framtíðar talgilding og aldarinnar førleikakrøv

### Ríkisfelagsskapurin

Ríkisfelagsskapurin er í løtuni í einari spennandi legu. Tað eru nýggjar og semjusøkjandi tíðir. Øll trý londini kýta seg at finna skilagóðar loysnir á teimum átrokandi avbjóðingunum.

Fyrsti fundur í nýggja uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska samstarvsráðnum millum Føroyar, Danmark og Grønland var í Føroyum í summar, har 10 ráðharrar luttóku. Eftir fundin samdust londini um eina fundaryvirlýsing við niðurstøðum frá fundinum.

Samstarvsráðið bleiv stovnað seinasta heyst, og Føroyar hava havt formansskapin í fyrstu setuni. Samstarvsráðið er eitt stórt framstig, tí nú viðgera Danmark, Føroyar og Grønland í felag uttanríkis-, trygdar- og verjumál. Hesi trý málsøkini eru øll felagsmál.

Samstarvsráðið er stovnað, tí tørvur er á sterkari samstarvi og betri samskipan, nú uttanríkis-, trygdar- og verjumál fylla alsamt meira.

**Skipan við CVR nummari til føroyskar fyritøkur**
Sum kunnugt er ein skipan sett í verk, har fólk í Føroyum umvegis Ríkisumboðið kunnu útvega sær eitt danskt CPR- nummar og tilhoyrandi Nem-id. Hetta er fyrst og fremst ætlað at nýta til telduskpanir í Danmark, har hetta er eitt krav. Tað gagnar serliga teimum, ið ætlað sær undir lesnað, ella teimum, ið fara til Danmarkar í sjúkraørindum.

Nú Nem-id skipanin verður umløgd til Mit-id og Nem-login, verða tillagingar gjørdar í skipanini í Føroyum. Í sambandi við tillagingina hava danskir myndugleikar spurt, um føroyingar vilja hava eina líknandi skipan fyri virkir, soleiðis at føroysk virki kunnu útvega sær danskt CVR-nummar og eitt tilknýtt Mit-id og Nem-login at nýta til telduskipanir í Danmark, har hetta er eitt krav.

Á fyrispurning um hetta hava Vinnuhúsið og Advokatfelagið svarað, at tey vilja hava eina slíka skipan setta í verk í Føroyum. Løgmansskrivstovan hevur tí heitt á Digitaliseringsstyrelsen um at leggja føroyingum til ummælis uppskot til lógarbroytingar ella fyrisitingarligar skipanir, sum ger hetta møguligt.

**Dagføring og føroyskan av revsilógini**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa alla revsilógina dagførda og á føroyskum máli. At dagføra alla revsilógina er sera stórt arbeiði og rættiliga tíðarkrevjandi, og tí er tað gjørt í stigum. Hetta ger tað samstundis møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari, bæði málsliga og innihaldsliga.

Í tingsetunum 2016-2021 vórðu kap. 13-29 í revsilógini dagførdir, nútímansgjørdir og orðaðir á føroyskum. Í komandi tingsetu er ætlanin at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um dagføring av kap. 1-11 í revsilógini, sum er almenni parturin av revsilógini. Eftir hetta er øll revsilógin orðað á føroyskum. Síðan verður farið undir eina tilgongd, har øll lógin samlað verður eftirhugd og laga til føroysk viðurskifti.

**Umskipan av Føroya Kærustovni**
Í tingsetuni 2021 samtykti Løgtingið eina nýggja løgtingslóg um Føroya Kærustovn. Lógin kom í gildi 1. januar 2022.

Við lógini er Kærustovnurin skipaður sum sjálvstøðugur og óheftur myndugleiki. Hetta merkir, at 11 kærunevndir, sum Føroya Kærustovnur áður hevur verið skrivstova hjá, verða tiknar av gjøgnum eitt tvey ára tíðarskeið. Harumframt verður Fjølmiðlanevndin flutt. Fyrstu seks nevndirnar eru tiknar av.

**Løgtingslóg um keyp av fastogn í Føroyum**
Endamálið við lógini er 1) at hava eftirlit við og í ávísan mun avmarka atgongdina til føroyska fastognarmarknaðin, 2) at tryggja, at tann, sum eigur fastogn í Føroyum hevur persónligt ella vinnuligt tilknýti til Føroyar, 3) at tryggja, at talið á útlendingum, sum eiga fastogn í Føroyum ella í ávísum økjum í Føroyum, ikki verður ov stórt, og 4) samstundis tryggja, at tað ikki verða settar óneyðugur forðingar fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum, ið er føroyska samfelagnum at gagni.

Meginreglan er, at persónar, sum hava fastan bústað í Føroyum ella áður hava búð í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum í samanlagt 5 ár, kunnu keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrinum, og at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum hava sítt høvuðssæti í Føroyum, kunnu keypa fastogn uttan loyvi frá landsstýrinum. Aðrir persónar og fyritøkur enn tey omannevndu kunnu bara keypa fastogn við loyvi frá landsstýrinum.

Lógin kom í gildi 14. desember 2021. Higartil eru givin 5 loyvi til privatpersónar og 1 loyvi til felag.

**Broyting í revsilógini, samtykkisgrundað neyðtøkuáseting og herðing av revsing**
Neyðtøka er ein av teimum álvarsligastu persónligu brotsverkunum og hevur við sær grova skemd av kynsliga sjálvsavgerðarrættinum. Gamla ásetingin um neyðtøku hevði sum fyritreyt, at gerningsmaðurin hevði brúkt nærri ásett slag av tvingsli, ella at órættaði hevði verið í slíkum standi ella slíkari støðu, at viðkomandi ikki hevði verið førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini.

Revsilógini er nú broytt, soleiðis at tað frameftir verður staðfest, at samlega við ein persón, sum ikki samtykkir, er neyðtøka. Ásett er, at samtykkið skal vera givið við orðum, gerðum ella síggjast í tí ítøkiligu støðuni og høpinum.

Við lógarbroytingini er revsingin fyri neyðtøku og fyri samlegu við eitt barn undir 15 ár eisini herd. Broytingin ber í sær, at vanliga revsingin fyri at noyða annan til samlegu, fyri samlegu við barn undir 12 ár og fyri at skaffa sær samlegu við barn undir 15 ár við at gera sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág verður longd við 1 ári í mun til galdandi dómssiðvenju.

Hetta merkir, at revsingin fyri neyðtøku og samlegu við barn undir 15 ár, ið sum útgangsstøði áður var 2 ár og 6 mðr., frameftir verður mælt til at leingja til 3 ár og 6 mðr. Broytingarnar komu í gildi 1. juni 2022.

**Nýggj lóg um revsifulnað**
Serstøk lóg um revsifulnað fyri Føroyar er í gerð. Endamálið við lógini um revsifullgerð er fyrst og fremst grundsjónarmiðið um, at revsifullgerð og serstakliga frælsisrevsing er eitt so víðfevnt rættarøki,

at reglurnar á økinum eiga at vera gjørdar við lóg, og ikki sum í dag, har tað í størstan mun er við fyrisitingarligum reglum.

Eitt annað endamál við lógini er at betra munandi um møguleikan hjá revsifullgerðarmyndugleikunum í Føroyum at røkja sínar uppgávur í sambandi við revsifullgerð. Hetta er galdandi t.d. viðvíkjandi kunningartøkni, dátuvernd og møguleika at finna fram upplýsingar í sambandi við parlamentariskt eftirlit við myndugleikaútinnanini, umframt í teimum verkligu mannagongdunum í sambandi við mongu avgerðirnar, sum verða tiknar við heimild í lógini. Lógin kemur í gildi 1. januar 2023.

**Broyting og dagføring av konkurslógini**
Løgtingið samtykti í mars í ár eitt ríkislógartilmæli um dagføring av konkurslógini fyri Føroyar. Mest týðandi broytingarnar í uppskotinum snúgva seg um endurskipan (rekonstruktion) og trotabúsbann (konkurskarantæne).

Endamálið við reglunum um endurskipan er at betra møguleikarnar fyri, at virki, sum hava fíggjarligar trupulleikar, kunnu halda fram við at virka í staðin fyri at verða koyrd á húsagang. Reglurnar um endurskipan koma í staðin fyri galdandi reglur um gjaldsteðg og neyðskuldarsemju, sum tískil verða settar úr gildi við uppskotinum.

Endamálið við reglunum um trotabúsbann er at fyribyrgja konkurskriminaliteti og "konkursrytteri", sum er, tá ið partafelagsformurin ella smápartafelagsformurin systematiskt verður misnýttur til skaða fyri kreditorar.

Reglurnar snúgva seg um, at ein persónur, sum er farin á húsagang við einum virki, ella sum er uppi í einum felagi undir avtøku, í eitt tíðarskeið kann fáa bann fyri at reka ávís sløg av vinnuvirksemi. Treytin er, at viðkomandi hevur sýnt grovt skilaleysa virkisleiðslu og tí verður mettur óegnaður at vera í leiðsluni í einum felagi við avmarkaðari ábyrgd, t.e. smápartafelag ella partafelag. Viðkomandi kann eftir umstøðunum eisini fáa bann fyri at vera í leiðsluni í einum felagi uttan avmarkaða ábyrgd. Broytingarnar koma í gildi tann 1. januar 2023.

**Dagføring av lógini um Fólkatingsins umboðsmann**
Lógin um Fólkatingsins umboðsmann er dagførd. Lógarbroytingin snúði seg um 1) stovnan av Barnaskrivstovu umboðmansins, sum skal tryggja og hava eftirlit við verksetan av rættindum hjá børnum sambært barnasáttmálanum hjá ST, og 2) at avmarka starvstíðina hjá Fólkatingsins umboðsmanni til 10 ár. Fólkatingsins umboðsmaður hevur eftirlit við virkseminum hjá teimum pørtum av almennu umsitingini í Føroyum, sum ríkismyndugleikarnir umsita. Broytingarnar komu í gildi 1. juli 2022.

**Ígildisseting av rættarverjulógini**
Dátuverndarlógin, sum hevði íblástur úr GDPR, kom í gildi tann 1. januar 2021 í staðin fyri gomlu persónsupplýsingarlógina. GDPR var tó bara helvtin av "dátuverndarpakkanum" hjá ES. Hin helvtin

var rættarverjudirektivið. Við støði í hesum direktivinum samtykti Fólkatingið í 2017 Retshåndhævelsesloven, Rættarverjulógina, sum við nøkrum tillagingum er sett í gildi fyri Føroyar.

Rættarverjulógin er ein serlig persónsupplýsingarlóg fyri rættarverjandi myndugleikar, sum viðgera persónsupplýsingar við tí endamáli at fyribyrgja, kanna, avdúka ella rættarsøkja revsiverdar gerðir ella við tí endamáli at útinna revsirættarligar atgerðir (t.e. at útinna revsing). Rættarverjulógin er galdandi fyri rættarverjandi ríkismyndugleikar í Føroyum. Rættarverjandi ríkismyndugleikar í Føroyum eru Føroya Politi, Ákæruvaldið, Føroya Rættur, Kriminalforsorgin og Arktisk Kommando. Lógin kom í gildi 1. juli 2022

**Fongsulsviðurskiftini í Føroyum**

Í 2021 kom ein danskur/føroyskur embætisbólkur við frágreiðing um fongsulsviðurskiftini í Føroyum. Frágreiðingin lýsti viðurskifti og avbjóðingar hjá innsettum í Mjørkadali og hugdi síðani at hóskandi loysnum á økinum. Frágreiðingin nágreinaði, hvussu ábøtur kunnu gerast, m.a. við stórari umbygging í Mjørkadali ella við nýggjum fongsulsbygningi. Mett varð, at tað einans er ein nýggjur fongsulsbygningur, sum nøktar allan tørvin hjá innsettum í Føroyum.

Tað er tí at fegnast um, at løgmaður og danski forsætisráðharrin í juni mánað undirskrivaðu eina ætlanaryvirlýsing um, at danska stjórnin nú fer undir arbeiðið at byggja eitt nýtt fongsul í Føroyum. Fyrireikingarnar fara í gongd beinanvegin, og væntandi verður fongslið klárt at taka í nýtslu í 2030. Hetta er ein týdningarmikil varði fyri føroysku rættartrygdina, tí tað er ein mannarættur at kunna sita dóm í sínum egna heimlandi. Tað er gott, at umstøðurnar nú verða virðiligar og tíðarhóskandi.

**Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum**

Løgmaður fekk í vár handað eina heildarætlan við tilmælum um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtsluna í Føroyum 2022–2028. Heildarætlanin fatar um 58 ítøkilig tilmæli á fimm átaksøkjum: fyribyrging, viðgerð, eftirliti, revsifulnað og vitanargrundarlagi. Tilmælini eru í høvuðsheitum úrslit av tilfari, sum arbeiðsbólkurin hevur savnað inn frá áleið 75 ymiskum hoyringspørtum. Í sambandi við heildarætlanina bleiv skipað fyri almennari ráðstevnu, har meiri enn 200 fólk luttóku.

Løgmaður og avvarðandi landsstýrisfólk hava høvuðsábyrgd av, at tilmælini verða sett í verk. Ætlanin er at seta ein stýrisbólk, sum skal gera eina ætlan fyri, hvussu heildarætlanin kann setast í verk, og hvussu tilmælini kunnu fremjast. Somuleiðis er ætlanin at seta ein verkbólk, sum fær ábyrgd av, at tilmælini verða sett í verk í samsvari við avgerðirnar hjá stýrisbólkinum. Bólkurin skal somuleiðis tryggja tvørgeiraliga samstarvið.

**Lógardygd og rundskriv um lógarsmíð**

Lógartænastan arbeiðir støðugt við at betra um dygdina á lóggávusmíðnum hjá landsstýrinum. Sum dømi kunnu nevnast *løgbitar* og *løgrit.*

Ætlanin við *løgbitunum* er stutt at lýsa nøkur yvirskipað evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ið ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast. Løgbitarnar hava starvsfólk á lógartænastuni skrivað og í nøkrum førum í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleika, sum hava serligan kunnleika á økinum, sum løgbitin viðvíkur.

Ætlanin við *løgritunum* er at fáa ymisk løgfrøðilig evni lýst á føroyskum og úr føroyskum sjónarhorni. Tað kann vera ein lýsing av ávísum løgfrøðiligum evni ella fyribrigdi ella ein breiðari lýsing av lóggávuni á ávísum fakøki, t.d. almannalóggávu, fiskivinnulóggávu, skúlalóggávu o.tíl.

Tað er lógartænastan, sum gevur út løgritini, men øll embætisfólk í stjórnarráðunum og teirra stovnum, sum hava serligan kunnleika á ávísum fakøki ella um eitt ávíst fakligt evni, kunnu skriva løgrit.

*Eftirkanning og ársfrágreiðing*
Øll lógar- og kunngerðauppskot skulu eftirkannast hjá lógartænastuni, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Sambært seinastu ársfrágreiðingini fyri tingárið 2020 hevur lógartænastan eftirkannað 234 uppskot. Í frágreiðingin verður eisini víst á, at tað framvegis er ein avbjóðing, at nógv lógaruppskot ikki hava tilmældu ummælisfreistina á 4 vikur.

*Skeið í lógarsmíð*
Í heyst fer lógartænastan undir eitt nýtt 2-daga grundskeið í lógarsmíði, sum er fyri øll í miðfyrisitingini, men serliga ætlað teimum, sum fáast við lógarsmíð. Á skeiðnum verður kunnað um meginreglurnar í lógarsmíði, og um hvussu rættarreglur skulu skrivast, herundir ásetingar um revsing og gildiskomu. Eisini verður komið inn á teir spurningar, sum skulu vera umhugsaðir, tá ið rættarreglur verða gjørdar, serliga lógaruppskot og broytingaruppskot.

## FÍGGJAR-, BÚSKAPAR- OG SAMFERÐSLUMÁL

### Føroyski búskapurin
Føroyska samfelagið hevur stórar búskaparligar avbjóðingar, tá ið hugsað verður um afturvendandi sveiggini í búskapinum frá okkara tilfeingisvinnum og tá ið um ræður haldførið í almenna búskapinum. Neyðugt er tí at stýra við varsemi og nærlagni, so Føroyar koma væl ígjøgnum hesar avbjóðingar, uttan at vælferðin verður sett í vanda. Somuleiðis eru Føroyar millum tey lond í Vesturheiminum, sum eru komin frægast og minst ávirkað gjøgnum tíðina við koronu.

Útgangsstøðið fyri føroyska búskapin er gott, og búskapurin er væl fyri at handfara eitt møguligt tíðarskeið við minni vøkstri og halli í landskassanum. Tað almenna í Føroyum er ikki serliga skuldarbundið, um sammett verður við onnur lond í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 20% av BTÚ, og bruttoskuldin hjá kommunum er um 1,5 mia. kr. ella 5-10% av BTÚ. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur 2,68 mia. kr. í skuld, ella um 12% av BTÚ, sum landið hevur latið ferðsluveðhald til. Hetta gevur tilsamans um 40% av BTÚ í almennari bruttoskuld, sum er áleið tað sama, sum almenna skuldin í Danmark.

**Lagaligari krøv um grannskoðan fyri stuðul**
Krøvini um grannskoðan av roknskapum hjá teimum, sum hava fingið stuðul frá ymiskum játtanum hjá landinum eru gjørd lagaligari, soleiðis at tey eru rímuligari í mun til játtaðu stuðulsupphæddina.

**Styrkt samstarv millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið**
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava gjørt rammuavtalu, har staðfest verður, at partarnir í mest møguligan mun samstarva um sáttmálasamráðingar og sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Rammuavtalan skal tryggja samstarv um sáttmálar og eitt javnt lønarlag í almenna og kommunala geiranum og leggur upp til kunning so hvørt og samstarv um lønarsamráðingar. Avtalan ber í sær, at miðað verður eftir felags sáttmálum, har tað ber til. Har annar parturin bert hevur fá starvsfólk á økinum, ger størri parturin sáttmála, og hin parturin tekur undir við honum.

**Sáttmálasamráðingar**
Níggju sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum fóru úr gildi tann 1. oktober 2021, m.a. tann við størsta fakfelagið, Starvsfelagið.

Nýggjur 3 ára sáttmáli varð gjørdur við Starvsfelagið í januar 2022. Hann fevnir um lønarhækking á 1,25% fyrsta árið og 2,75% triðja árið. Tann 1. oktober í ár hækka lønirnar í krónum, soleiðis at tær lægru lønirnar hækka við 740 krónum og tær hægru við 540 krónum. Hetta svarar til ein samlaðan lønarkarm á 6,2% yvir 3 ára skeiðið.

Síðani eru sáttmálar gjørdir við fimm onnur fakfeløg eftir sama leisti. Enn eru tó tríggir sáttmálar eftir frá hesum umfarinum, og tann 1. oktober í ár fara tjúgu sáttmálar úr gildi, millum annað við Føroya Lærarafelag og Akademikarafelagið.

**Fráfaringaraldurin á almenna arbeiðsmarknaðinum er hækkaður til 72 ár**
Landsstýrið hevur hækkað fráfaringaraldurin hjá alment settum starvsfólkum, soleiðis at fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum starvsfólkum er farin úr 70 árum upp í 72 ár, samstundis sum fráfaringaraldurin fyri tænastumenn eisini er hækkaður tilsvarandi.

Endamálið er at geva teimum sum vilja tað, møguleika at verða longur á arbeiðsmarknaðinum.

**Skattafrádrátturin fyri húsaleigu á 100.000 kr. galdandi til og við 2025**
Skattafrádrátturin fyri húsaleigu eftir bruttoskipanini hækkaði úr 50.000 kr. til 100.000 kr. frá 1. januar 2019. Upprunaliga varð ásett, at skattafrádrátturin skuldi lækka aftur til 50.000 kr. 31. desember 2021. Men Løgtingið samtykti í desember 2021 at leingja skipanina við 100.000 kr. í skattafrádrátti til og við ársenda 2025. Tá ið skipanin við 100.000 kr. í frádrátti hevur virkað í nøkur ár, er ætlanin at eftirmeta skipanina fyri at vita, um hækkaði frádrátturin ger, at fleiri leigumál verða tøk til langtíðarleigu.

**Fámjinstunnilin**
Løgtingið samtykti í oktober 2021 verklagslóg um at gera nýggja farleið millum Ørðavík og Fámjin. Verkætlanin fevnir um ein tunnil við tilhoyrandi vegagerð. Í apríl 2022 samtykti Løgtingið at hækka játtanarkarmin til verkætlanina til 207 mió. kr. Hetta svarar til eina dagførda kostnaðarmeting, eftir at verkætlanin hevur verið í útboði.

Nýggja farleiðin verður samanlagt 2,6 km til longdar. Sjálvur tunnilin verður umleið 1.200 metrar langur. Haraftrat skulu umleið 1,2 km av vegi gerast ørðavíkarmegin og umleið 400 metrar av vegi gerast fámjinsmegin.

Sáttmáli er gjørdur við arbeiðstakara í mai 2022, og arbeiðið byrjar seinni í ár. Gongur sum ætlað, verður nýggja farleiðin liðug á sumri 2024.

**Prísbroytingar í Eysturoyartunlinum**
Ferðslan í Eysturoyartunlinum er minni enn mett, og á fíggjarlógini fyri 2022 eru játtaðar 35 mió. kr. í ferðsluveðhaldi. Ferðsluveðhaldið verður goldið hálvárliga sambært uppgerð frá felagnum. Fyri seinna hálvár 2021 hevur landið rindað 27,4 mió. kr. í ferðsluveðhaldi.

Tunnilsfelagið hevur á fíggjarlógini fyri 2022 fingið 7 mió. kr. í stuðli til at lækka prísirnar fyri tey, sum koyra ofta. Felagið broytti frá 1. januar 2022 prísirnar fyri persónbilar, sum koyra í Eysturoyartunlinum, soleiðis at prísurin lækkaði munandi hjá teimum, sum koyra ofta gjøgnum tunnilin. Hendan skipan er víðkað frá 1. juli 2022 til eina mánaðarliga fastprísskipan.

Frá 1. august 2021 vórðu tillagingar eisini gjørdar í prísunum fyri lastbilar, trailarar og tangabilar, sum koyra gjøgnum Eysturoyartunnilin. Harumframt varð ein avsláttarskipan sett í verk, alt eftir hvussu nógv lastbilar, trailarar og tangabilar koyra hvørt hálvár.

Ferðslan í Eysturoyartunlinum er vaksin munandi í ár sammett við somu mánaðir í 2021. Tá er hædd tikin fyri, at ókeypis var at koyra part av januar 2021.

**Frágreiðing um Strandfaraskip Landsins**
Landsstýrið setti í mai 2021 ein uttanhýsis arbeiðsbólk at lýsa og meta um virksemið hjá Strandferðsluni og at gera tilmæli um broytingar og batar. Arbeiðsbólkurin legði fram frágreiðing og tilmæli í mars 2021.

Niðurstøðurnar hjá arbeiðsbólkinum eru í stuttum, at tænastusáttmáli eigur at verða gjørdur, har politisku ynskini verða skipað í hóskandi og fastar karmar, at Strandferðslan eigur at verða skipað sum sjálvstøðug eind fyri at tryggja betri umstøður at leggja raksturin til rættis, og at gongd verður sett á arbeiðið at endurnýggja ferjuflotan. Samferðslubólkurin hjá samgonguni viðger tilmælini.

**Nýtt farmaskip á Suðuroyarleiðini**
Stórt trýst er á Suðuroyarleiðini. Smyril er einasta skip á Suðuroyarleiðini og skal í dokk umleið triðja hvørt ár. Sera trupult er at fáa fatur á hóskandi avloysaraskipi, og hetta er eisini sera dýrt.

Leiguavtala er gjørd við íslendskar myndugleikar til á heysti 2023 um ferjuna Herjolf III, sum er avloysaraskip á leiðini til Vestmannaoyggjar. Herjolfur III skal fyrst og fremst roynast sum farmaskip á Suðuroyarleiðini, men skal eisini avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk í august mánað í ár.

**Aldursmarkið at fáa Samleikan lækkað til 13 ár**
Løgtingið hevur samtykt lógaruppskot um at lækka aldursmarkið til at fáa Samleikan, úr 15 árum niður í 13 ár. Fleiri áhugapartar hava víst á tørvin at lækka aldursmarkið. Til dømis hava peningastovnarnir víst á, at ung byrja at arbeiða og fáa løn, tá ið tey eru 13 ár. Somuleiðis vilja kommunurnar brúka Samleikan, tá ið ung søkja starv í "Ung í arbeiði" um summarið.

**Leiðreglur fyri umsiting av fyritøkum og grunnum landsins**
Fíggjarmálaráðið hevur arbeitt við at skipa umsitingina av almennum fyritøkum, og hevur gjørt leiðreglur fyri umsiting av fyritøkum hjá landinum. Leiðreglurnar skulu gera sítt til, at tað verður skaptur greidleiki um grundgevingarnar fyri, nær landið er eigari, um yvirskipaðu virkiskarmarnar, og um tær væntanir, sum landið hevur til fyritøkurnar.

Onkrar broytingar eru eisini farnar fram í fyritøkunum hjá landinum. Eitt nú varð Fíggingargrunnurin tikin av í 2021. Landsstýrið eigur nú beinleiðis ein triðing av Bank Nordik. Lógin fyri Realin er broytt, og t.d. verða krøv um vinningsbýti ásett í viðtøkunum.

**Frágreiðing um ognarliga sundurskiljing av Føroya Tele**
Landsstýrið heitti á nevndina í Føroya Tele um at kanna, um og hvussu fjarskiftisnetið kundi skiljast frá Føroya Tele, og hvørja ávirkan hetta hevur á marknaðin, og um aðrar loysnir eru. Copenhagen Economics hevur gjørt frágreiðing, sum nevndin í Føroya Tele hevur latið landsstýrismanninum. Frágreiðingin skal nú viðgerast, áðrenn avgerð verður tikin um, hvat síðani skal henda í málinum.

**<u>Átøk komandi tingár:</u>**

**Búskapurin**
Koronufarsóttin og príshækkingarnar, sum millum annað eru komnar orsakað av russisku innrásini í Ukraina, hava stóra óvissu við sær og koma aftrat afturvendandi avbjóðingunum við sveiggjum í fiskaprísum, nøgdum og oljuprísum. Tí er umráðandi, at stýrt verður við skili í hesum tíðum, og at gera neyðugu tillagingarnar í almenna geiranum fyri framhaldandi at tryggja øllum føroyingum vælferð. Stóra uppgávan komandi ár verður sostatt at fáa Føroyar trygt ígjøgnum tíðina, sum kemur nú við stórari óvissu, kríggi í Evropa, rentuhækkingum og stórum prísvøkstri.

**Útveiting av almennum uppgávum**
Har tað er møguligt og skynsamt, skal privata vinnan hava møguleika at bjóða upp á almennar tænastur. Treytin er sjálvandi, at hetta fíggjarliga og tænastuliga er betri fyri brúkaran. Í komandi tingsetu er ætlanin at orða ein útveitingarpolitikk.

**Økt eftirlit við innflutningi av rúsevnum**
Sambært heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnisnýtslu skal TAKS næstu árini fremja átøk, sum væntandi fara at bøta um eftirlitið við innflutninginum til landið soleiðis, at tað verður torførari at flyta rúsevni inn í landið.

Ætlanin er at menna eina føroyska profileringsskipan, soleiðis at marknaðareftirlitð hjá TAKS gerst munadyggari og beinraknari.

Tørvur er eisini á at dagføra skannararnar hjá TAKS. Ein nýggjur skannari varð keyptur í 2021, og væntandi verður ein keyptur afturat í ár. Ætlanin er somuleiðis at keypa tveir afturat komandi tvey árini.

Í sambandi við eina komandi dagføring og útbygging av flogvøllinum í Vágum er ætlanin, at TAKS skal fáa nýggj eftirlitshøli. Hetta fer at ger eftirlitsarbeiðið betri og virðiligari fyri ferðafólk og tollarar.

Somuleiðis er ætlanin, at TAKS skal fáa nýggj eftirlitshøli í samband við ætlanina at byggja nýggja komuhøll til Norrönu á Skansabryggjuni. Hetta fer at gera eftirlitið effektivari og virðiligari. Í hesum sambandi er ætlanin eisini at keypa ein bingjuskannara.

**Verkætlanin Tunlar norður um Fjall heldur fram**
Fyrsta skotið fyri tunlarnar norður um Fjall varð latið av síðst í september 2021, og arbeiðið at gera nýggju tunlarnar gongur væl og eftir ætlan. Roknað verður við, at byggitíðin verður 4 ár, og at farleiðin verður liðug í 2024. Landsverk metir, at gongur eftir ætlan, verður skotið ígjøgnum fyri báðar tunlarnar í ár. Verkætlanin verður mett at kosta umleið 522 mió. kr.

**Verkætlanin Dalstunnilin heldur fram**
Tunnilsliðið hjá Landsverki fór í november 2020 undir at gera nýggja farleið til Dals. Tunnilin verður 2,2 kilometrar langur og tilhoyrandi vegagerð er 300 metrar. Arbeiðið hevur gingið væl. Eykajáttan varð veitt til verkætlanina í 2022, so at arbeiðið kann ganga skjótari.

**Vestmannatunnil**
Farið er undir at fyrireika tunnil til Vestmanna. Ymiskar loysnir verða kannaðar, og verkætlanin verður eftir ætlan prosjekterað, tá ið ein linjuføring er vald. Tað eru játtaðar 5 mió. kr. til endamálið í ár. Tá ið allar fyrireikingar eru lidnar ber til at bjóða arbeiðið út og gera eina verklagslóg. Eftir løguætlanini verða 363 mió. kr. játtaðar samanlagt næstu árini til at gera Vestmannatunnilin við tilhoyrandi vegagerð.

**Suðuroyartunnilin verður fyrireikaður**
Landsstýrið arbeiðir við at fyrireika ætlanina um at gera ein suðuroyartunnil. Ymiskir møguleikar eru kannaðir viðvíkjandi linjuføringum. Ætlanin er at koma til eina niðurstøðu, har mælt verður til eina linjuføring, ið leggur upp fyri kostnaði, trygd og framtíðar vegakervi sum heild.

Jarðfeingi hevur gjørt tilmæli til Landsverk um, hvørjar jarðfrøðiligar kanningar eiga at verða gjørdar fyri at hava eitt haldgott grundarlag at fara undir verkætlanina. Hildið verður fram at gera forkanningar og at fyrireika tunnilin. Við framflyting av óbrúktari játtan er tøka játtanin til forkanningar og fyrireikingar 1,8 mió. kr. í 2022. Landsstýrið hevur sett 100 mió. kr. av til tunnilin frá 2025 og frameftir á langtíðarløguætlanini. Eisini eru játtaðar 4 mió. kr. í 2022 til at stovna partafelagið Suðuroyartunnil.

Fyribils er mett, at tað fer at taka umleið 8 ár at byggja suðuroyartunnilin. Tá eru fyrireikingar, undankanningar og prosjektering ikki við. Ætlanin er at gera lógaruppskot komandi tingár, sum heimilar at gera eitt forprojekt og eitt møguligt endaligt projekt, sum er klárt at bjóða út.

**Nýggj hølir til Akstovuna í norður-/eysturøkinum**
Arbeitt verður við, at Akstovan fær nýggja sýnshøll og arbeiðshøli í Eysturoynni, sum ætlandi verður fyri norður-/eysturøkið. Endamálið er at kunna effektivisera virksemið hjá Akstovuni í norður-/eysturøkinum, at betra um umstøðurnar hjá starvsfólkunum á Akstovuni umframt at kunna veita betri tænastu til borgarar í norður-/eysturøkinum millum annað í sambandi við sýn av akførum.

**Stimbra føroyska kt-vinnu**
Samgongan hevur sett sær sum mál, at kunningar- og samskiftisvinnan skal strimbrast. Ein týðandi partur av at stimbra føroyska kt-vinnu er Talgildu Føroyar. Somuleiðis hevur landsstýrið sum part av arbeiðinum í Vakstrarforum fingið eina frágreiðing um vøkstur í kt-vinnuni. Í frágreiðingini eru 26 tilmæli til politisku skipanina, sum øll stuðla undir ætlaða vøksturin í kt-vinnuni. Landsstýrið fer í næstum at viðgera tilmælini, og hvussu tey kunnu setast í verk.

**Samleikin**
Føroysku peningastovnarnir brúka nú Samleikan sum innritanarloysn til netbankan. Kundarnir brúka Samleikan til at fáa atgongd til netbankan og at skriva undir skjøl og flytingar talgilt. Íløgan í Talgildu Føroyar skal gagnnýtast, og hetta merkir, at fleiri almennar tænastur mugu gerast meira talgildar og nútíðarhóskandi. Arbeitt verður í løtuni við at menna eina talgilda virkisskrá, sum væntandi verður liðug í 2023.

**Skúlanet**
Gjaldstovan og Undirvísingarstýrið arbeiða við eini ætlan um eitt Skúlanet fyri skúlar undir landinum og kommununum. Skopunar og Sørvágs kommuna gjørdust síðst í apríl 2022 fyrstu kommunur at gera avtalu við Gjaldstovuna um nýggja Skúlanetið. Fleiri aðrar kommunur og almennir undirvísingar-

stovnar eru ávegis at gera líknandi avtalu. Skúlanet er skipað sum samstarv millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunur, skúlar, útbúgvingarstovnar og Gjaldstovuna, sum umsitur Landsnet. Roknað verður við, at tað fer at taka 2 ár at verkseta Skúlanet liðugt.

**Cybertrygdarætlan**
Cybertrygd er at verja teldur, ambætarar, mobilar eindir, elektróniskar skipanir, net og dátur frá illviljaðum (óndsinnaðum) álopum. Landsstýrið hevur tí sett sær fyri, at Føroyar skulu hava eina cybertrygdarætlan. Landsstýrið ætlar, at cybertrygdarætlanin verður klár við árslok 2022.

**Almennur ognarskapur**
Landsstýrið vil tryggja, at fyritøkurnar hjá landinum verða umsitnar á bestan hátt, men fer eisini at taka støðu til, um tað er skilabest at einskilja fyritøkur. Landsstýrið ætlar at selja sín ognarlut í Tjaldri og Smyril-Line í 2022 og umhugsar ognarlutin í øðrum feløgum.

## FISKIVINNU- OG TILBÚGVINGARMÁL

**Rættindi knýtt at stálinum**
Í samgonguskjalinum frá september 2019 er millum annað ásett, at fiskiloyvini skulu knýtast at stálinum, at umsetiligheit er loyvd, og at besta gagnnýtsla fæst úr tilfeinginum, um loyvini verða útskrivað sum eginkvotur. Við ársenda í 2019 varð fyrsta stigið í ætlan landsstýrisins tikið, tá ið sjófeingislógin varð samtykt. Í 2020 og 2021 eru fleiri stig tikin – umframt sjófeingislógina – við tí endamáli at fremja ætlan landsstýrisins.

1. januar 2022 vóru rættindini knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi. Talið á veiðiloyvum hjá viðkomandi rættindahavara varð lagt fast í endaliga legu.

**Eginkvotur og fiskidagar**
Arbeiðið at leggja rættindi um til eginkvotur er komið væl áleiðis. Í 2022 er skipanin at veiða rækjur við Svalbard skipað við eginkvotum. Sama skipan við eginkvotum er sett í verk fyri føroyska fiskiskapin við línu í bretskum sjógvi eftir hýsu, longu og brosmu. Ein serskipan er sett í verk fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2022. Fiskidagar til línuveiðu til fiskifør yvir 15 tons kunnu avhendast øðrum fiskifari við fiskiloyvi í sama bólki.

**Fiskiskapur á Føroyabanka**
Í 2022 er ein serskipan sett í verk fyri fiskiskap á Føroyabanka, ið er víðfevndari enn tær royndir, ið hava verið gjørdar seinastu árini. Í hesari skipan fáa línuskip, 110 tons og størri, eins og útróðrarbátar 15-110 tons tillutað 8 fiskidagar til hvørt fiskifar. Smærru útróðrarbátarnir undir 15 tons fáa tillutað 30 dagar tilsamans.

Henda skipan er liður í einari størri ætlan, ið hevur til endamáls at skipa fiskiskapin á Føroyabanka sum vanligan vinnuligan fiskiskap. Treytin fyri varandi skipan av vinnuligum fiskiskapi er, at skipanin verður grundað á burðardygga gagnnýtslu. Ætlandi skulu framhaldandi royndir, sum Havstovan stendur fyri og serskipanin tryggja myndugleika og serfrøði nøktandi tilfar til støðutakan um eina varandi vinnuliga skipan.

**Fiskiveiðusamráðingar**
Á heysti í 2020 varð karmsáttmáli millum Føroyar og Bretland undirritaður. Regluligar samráðingar hava verið um sáttmála um sínámillum fiskirættindi partanna millum. Í 2022 var komið á mál, tá ið Føroyar og Bretland undirritaðu eina semju um sínámillum fiskirættindi fyri 2022.

Umframt sínámillum fiskirættindi leggja londini serligan dent á varðveitslu og sjálvberandi nýtslu av livandi tilfeingi havsins eins og at lætta um vísindaliga gransking av havlívfrøði og havumhvørvi. Sum nakað serligt, eru Føroyar og Bretland samd um at fara undir eina tilgongd at menna tey strategisku viðurskiftini landanna millum.

Støðan millum Føroyar og ES er øðrvísi samanborið við Føroyar og Bretland. Enn hevur ikki eydnast at finna semju um fiskivinnusamstarv, ið báðir partar kunnu góðtaka. Nú er so mikið útliðið í 2022, at næsta stigið í samráðingunum verður at fyrireika arbeiðið til eina fiskiveiðiavtalu fyri 2023.

Stórar avbjóðingar hava verið seinastu árini við samráðingunum millum strandarlondini um uppsjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel. Hóast eingin semja er fest í avtalu, so er regluligt samband millum partarnar so at siga alt árið. Harnæst verður vísindaligt tilfar dagført. Ein dagførd frágreiðing um útbreiðslu og ferðingarmynstur hjá makreli varð latin úr hondum í vár. Seinni í ár verða ætlandi líknandi frágreiðingar tøkar um svartkjaft og norðhavssild.

Føroyar hava sett sær fyri at leggja stóra áherðslu á arbeiðið at finna semjur. Í fleiri umførum hava Føroyar víst á møguleikan at fara aftur til eitt grundarlag, sum makrelsemjan frá 2014 bygdi á, og arbeiða framhaldandi út frá hesum grundarlagi. Nevnda grundarlag skal stimbra undir og tryggja skynsama umsiting og burðardyggan fiskiskap.

Í 2022 hava Føroyar umframt við Bretland, undirritað fiskiveiðuavtalu við Grønland, Ísland, Noreg og Russland. Harumframt hava Føroyar eisini veiðirættindi í NAFO-øki, NEAFC-øki og og SPRFMO-øki. Ein yvirskipað ætlan fyri 2023 og frameftir er at troyta allar møguleikar fyri at varðveita tey rættindi, ið verandi avtalur fevna um, eins og at troyta allar møguleikar fyri vøkstri.

**Fiskiveiðueftirlit**
Tjaldrið er gamalt og lítið tíðarhóskandi. Tí má ein nøktandi loysn viðvíkjandi øðrum skipi, ið skal avloysa Tjaldrið, finnast. Enn er ikki borið á mál við einari loysn.

**Gransking og fiskivinnuroyndir**
Landsstýrið ásannar, at gransking og menning í veiðu og matvøruframleiðslu er avgerandi fyri kappingarførið hjá fiskivinnuni og virðisvøkstri.

Ítøkiligar ætlanir eru settar í verk, ið beinleiðis virka á hesum økinum. Ítøkiligar kvotur eru latnar í skipanunum "vinnuligar fiskiroyndir" og "vinnuligar royndir og verkætlanir". Fiskimálaráðið fylgir hesum ætlanum, har nýggjastu royndirnar fevna um fiskiskap eftir reyðæti, tunfiski, lakssild og prikkafiski. Aðrar ætlanir fevna um ítøkiliga meirgóðsking av tilfeingi eins og nýmenning á tøkniliga økinum.

Í langtíðarhøpi byggir landsstýrið sítt virksemi í gransking og royndum á tilmælið frá Vakstrarforumi, har mál verða sett um støðugan virðisvøkstur og vøkstur í útflutningsvirði. Sjøtul er settur á arbeiðið at fáa meira av tilfeinginum til høldar, og at tað verður ført til lands.

**Havstovan**
Í mong ár hava umboð fyri Havstovuna virkað í altjóða samstarvi í gransking og ráðgeving um havfrøðiligu støðuna í Norðuratlantshavi. Ítøkiliga fevnir granskingin um eitt nú rákið um alt norðurhavið, og hvønn týdning havstreymar hava á vistskipanir í havinum.

Føroyskir granskarar hava luttikið støðugt í hesum arbeiði nógv ár og lagt nógv tilfar úr hondum. Á júst hesum økinum varð føroyski Bogi Hansen heiðraður fyrr í ár fyri sítt sera virkna arbeiði innan fyri havgransking í ICES-høpi í nógv ár.

**Dagføring av grindalógini**
Løgtingslóg um grind og annan smáhval kom í gildi í 2015. Fiskimálaráðið hevur verið í samskifti við m.a. Grindamannafelagið, grindaformenn, sýslumenn og djóralækna við tí fyri eyga at fremja dagføringar og ábøtur. Í hesum samskifti hava ítøkiligar broytingar verið umrøddar um, hvussu eitt grindaøki verður allýst, og hvussu hetta verður fráboðað eins og ein nágreining av teimum heimildum, ið umboð fyri myndugleikan hava á økinum.

Landsstýrið ætlar at gera greiða niðurstøðu um møguligar dagføringar, áðrenn hetta samgonguskeiðið er lokið.

**Springarar**
Umframt grindamál sum heild hevur umrøða eisini verið um springarar. Landsstýrið ætlar, at í mesta lagi 500 springarar kunnu haldast til um árið. Nýggja hámarkið er eitt fyribils átak. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur í hesum sambandi sent uppskot um broyting í grindakunngerðini til hoyringar. Somuleiðis hava Føroyar heitt á vísindanevndina hjá NAMMCO um eitt tilmæli um burðardygga springaraveiðu, ið væntandi verður tøkt í 2023 ella 2024. Tá ið metingin hjá NAMMCO er tøk, verður hámarkið eftir ætlan tillagað.

### Máting av geislavirkni

Føroyar hava fingið nýggja útgerð til at máta geislavirkni. Ætlanin er, at nýggja útgerðin verður partur av størri evropeiskum netverki, sum mátar geislavirkni ymsastaðni í Evropa.

### Kommunur og tilbúgvingarætlanir

Arbeiðið at gera tilbúgvingarætlanir fyri allar kommunur er stórt og víðfevnt og lutfalsliga nýtt fyri flestu kommunur. Tær einstøku ætlanirnar eru nógvar í tali – umleið 19 – og tí tekur arbeiðið, roknað undir einum, drúgva tíð. Leysliga verður mett, at arbeiðið at gera tilbúgvingarætlanir hjá kommunum er komið væl áleiðis við árslok 2022. Landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum fylgir málinum og ger viðmerkingar eftir tørvi.

### Lýsing og kunning um tilbúgving

Arbeitt verður við at betra um kunning og lýsing av tilbúgvingini í síni heild, og hvussu hon er samskipað. Í tí sambandi verður ein heimasíða gjørd, ið er ætlað almenningi og myndugleikum, ið hava áhuga at kunna seg um kreppustýringina í Føroyum og tilbúgvingina í síni heild. Endamálið er eisini at lýsa uppgávur, skipan og ábyrgdarbýti í føroysku kreppustýringini.

### Veðurstova Føroya

Í 2021 bleiv “Veðurstova Føroya” sett á stovn. Í fyrsta umfarið vórðu ein deildarleiðari og tveir veðurfrøðingar settir í starv. Seint í vár søkti Veðurstova Føroya eftir einum kt-mennara, royndum veðurfrøðingi og fólki til veðurvakt og menning.

Við ársenda í 2022 verður ætlandi staðfest, at fyrsta stigið er rokkið at menna eina dagførda, útbygda og nøktandi føroyska veðurtænastu. Miðast skal ímóti, at seinna stigið í menningini verður framt í næstum. Í 2023 er ætlanin at fáa hægri játtan, soleiðis at tænastan er fult útbygt og á tann hátt kann gerast virkin alt samdøgrið.

Tænastan skal fevna um góða kunning og meira álítandi veðurforsagnir. Sum frá líður kann virksemið hjá Veðurstovu Føroya eisini gerast partur av gransking um veðurlagsøkið.

## HEILSUMÁL

### Heilsupolitikkur

Týðandi átøk eru gjørd á heilsuøkinum, síðan samgongan tók við, og fleiri týðandi átøk eru í væntu tað, sum eftir er av samgonguskeiðnum, umframt at arbeiðið at fremja tær nýskipanir og batar, sum gongd longu er sett á, heldur fram.

Fleiri varðar verða laðaðir á heilsupolitiska økinum hetta næsta árið. Ein teirra er nýggja Fólkaheilsustýrið, ið verður sett á stovn á nýggjárinum. Tá byrjar eisini ítøkiliga samstarvið ímillum Novo Nordisk Grunnin og Heilsumálaráðið, sum ætlandi skal veita føroyingum við diabetes og øðrum

endokrinologiskum sjúkum enn betri viðgerðartilboð, enn føroyska heilsuverkið longu veitir teimum, umframt at styrkja heilsugransking á økinum.

Eisini verður fyrsta stigið tikið at lyfta føroysku heilsugranskingina, tá ið nýggja heilsugranskingareindin formliga verður skipað. Tá ið granskingareindin fer at virka, verður øll heilsugranskingin savnað á einum stað.

Nýggi framkomni H-bygningurin á Landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu. Her er talan um eitt tøkniligt skarvslop í Sjúkrahúsverkinum, og umstøðurnar hjá bæði sjúklingum og starvsfólkum verða munandi bøttar og nýmótansgjørdar. Í nýggja H-bygninginum verður likamlig og sálarlig viðgerð eisini savnað undir somu lon.

Fremsta heilsupolitiska málið hjá samgonguni er enn sum áður viðgerðartrygdin; eingin sjúklingur skal bíða longur enn hægst neyðugt eftir at verða útgreinaður og sleppa í viðgerð.

Millum ítøkiligu átøkini hetta næsta árið kann nevnast, at farið verður undir at seta nýggju krabbameinsætlanina, sum varð handað landsstýrismanninum í heilsumálum í vár, í verk.

Landsstýrismaðurin ætlar eisini, at kommunulæknaskipanin skal endurskoðast við tí endamáli at menna heilsutænasturnar í nærumhvørvinum hjá borgarunum. Endurvenjing av fólki, sum hevur mist førleikar av sjúku ella skaða, fer eisini at hava høga raðfesting í nýggju tingsetuni, eins og hon hevur havt tað undanfarnu árini í samgonguskeiðnum.

Umframt nógvu átøkini, sum longu eru gjørd til tess at stytta bíðilistarnar á fleiri útgreiningar- og viðgerðarøkjum, skulu neyvari greiningar nú gerast at finna orsøkirnar til bíðilistarnar við tí fyri eyga uppaftur betur at kunna fyribyrgja og stytta teir.

Stór framstig eru gjørd á fleiri mótum í heilsuverkinum, og tað kann dragast fram, at sjøtul eisini er settur á týðandi raðfestingar á psykiatriska økinum. Eitt nú fáa ung, ið stríðast við angist og tunglyndi, nú tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp, tiltøk eru sett í verk at stytta bíðilistarnar til útgreining og viðgerð í barna- og ungdómspsykiatriini, og farið er undir eina tilgongd at skipa sálarliga bráðmóttøku.

Síðan tíðliga í 2020 hevur alt samfelagið og ikki minst heilsuverkið verið sera nógv merkt av koronufarsóttini, men hon er kortini ikki sloppin at skugga fyri heilsupolitisku málunum, samgongan setti sær fyri, tá ið hon varð skipað.

Fremsta endamálið við øllum raðfestingunum í heilsuverkinum er sjálvsagt at kunna veita betri og skjótari viðgerð og umstøður til sjúklingarnar.

**Atlimaskapur í WHO (World Health Organization)**
Samstarv og luttøka í WHO gevur Føroyum atgongd til virðismikla vitan, kunning, samstarv og gransking á heilsuøkinum, sum Føroyar annars ikki høvdu atgongd til.

**Tiltøk at minka um bíðilistar**
Hagtalseindin í Sjúkrahúsverkinum er styrkt, so í næstum fara bíðilistarnir at verða lýstir regluliga. Hetta er ein fyritreyt fyri at hava eina almenna skipan við viðgerðartrygd.

Fleiri tiltøk eru sett í verk m.a. sum avleiðing av longum bíðilistum. Serlæknar eru settir í starv, økt játtan er latin til at keypa fleiri konsulentar, betri samskipan millum sjúkrahúsini og betri atgongd er til MR- og CT-skannarar.

Við støði í nýggju bíðilistunum verður nú greinað, hvar orsøkirnar liggja, soleiðis at miðvís átøk kunnu gerast at loysa avbjóðingarnar sum frá líður – fyrst at byrgja fyri, at bíðilistarnir vaksa, og síðani at stytta teir.

**Koronustøðan**
Føroyar eru komnar væl gjøgnum farsóttina higartil. Sjúkrahúsverkið hevur ongantíð verið í álvarligum trupulleikum av koronu.

Nógv orka bleiv løgd í at kanna fólk fyri smittu. Tilsamans vórðu gjørdar 778.000 kanningar og stívliga 34.000 vórðu staðfest smittað.

**Koronukoppseting**
Tað hevur yvirhøvur gingið væl við koppsetingini í Føroyum. Undirtøkan hevur verið sera góð og gagnnýtslan av koppingarevni verið sera høg. Higartil eru um 105.000 koppsetingar framdar í Føroyum. Meir enn 90% hava fingið bæði prikini, og umleið 50% hava fingið 3. prik.

**Samskipa og menna Sjúkrahúsverkið**
Arbeitt verður miðvíst við at sameina Sjúkrahúsverkið, og kunngjørd er ein ætlan við meir enn 40 strategiskum málum, sum skulu samskipa og menna tey trý sjúkrahúsini til frama fyri sjúklingarnar.

**Nýumvældur bygningur til fyrisitingina á Klaksvíkar sjúkrahúsi**
Gomlu læknahúsini, "gula hús", verða umvæld og fara at hýsa fyrisitingini hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi, ið flytur úr starvsfólkabygninginum.

**Fleiri serlæknar í Sjúkrahúsverkinum og læknar undir útbúgving**
Seinnu árini hevur eydnast Sjúkrahúsverkinum at seta fleiri nýggjar serlæknar í starv innan fyri eina røð av sergreinum, sum ikki vóru í Sjúkrahúsverkinum áður.

Tað hevur alstóran týdning fyri heilsuverkið at kunna bjóða læknum útbúgvingarstørv í Føroyum, hetta hevur eisini verið raðfest seinastu árini, og talið á útbúgvingarstørvum er økt.

**Barna- og ungdómspsykiatriin og bráðfeingis sálarfrøðihjálpin raðfest**
Stig eru tikin at basa longu bíðilistunum í barna- og ungdómspsykiatriini. Orkan at útgreina ung, ið hava sálarligar avbjóðingar, verður nærum tvífaldað, tá ið játtanin til økið í ár fer at virka við fullari megi. Tað merkir eitt nú, at størri ferð kemur á útgreiningarnar fyri ADHD.

Játtan verður eisini í ár nýtt til at styrkja atkomuna til bráðfeingis sálarfrøðiliga hjálp, har útvald starvsfólk á Psykiatriska deplinum verða førleikament til at røkja bráðfeingis sálarhjálp-funktiónina, ið skal knýtast at Læknavaktini 1870.

**Ókeypis sálarfrøðilig viðgerð**
Royndarskipanin við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til ung í aldrinum 15-35 ár, sum stríðast við angist ella lætt til moderat tunglyndi, verður nú longd soleiðis, at talan verður um eina 3 ára royndarskipan, sum upprunaliga ætlanin var. Royndarskipanin hevur verið væl móttikin, og higartil hevur tørvurin á viðgerð verið størri, enn mett varð frammanundan.

**Dygdarkrøv til viðgerðarstovnar á rúsevnisøkinum**
Arbeitt verður við at seta eina skipan á stovn við dygdarmeting fyri viðgerðarstovnar á rúsevnisøkinum. Fyri at fáa góðkenning er treytin, at tilboðið eftir einari heildarmeting hevur neyðugu dygdina. Eitt nú skulu hølisviðurskiftini verða nøktandi, og somuleiðis skal starvsfólkabólkurin samanlagt hava viðkomandi útbúgvingar og royndir við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð.

**Endurskoða ílegulógina**
Ílegulógin kom í gildi í 2005. Nú lógin hevur 17 ár á baki, er tørvur á at endurskoða hana. Hetta arbeiði hevur verið í gongd eina tíð, og væntandi verður eitt lógaruppskot lagt fyri løgtingið í komandi tingsetu.

**Neyðtøkumóttøka í Sjúkrahúsverkinum**
Neyðtøkumóttøka er sett á stovn. Hetta ger tað møguligt hjá fólki, ið hevur verið fyri neyðtøku ella neyðtøkuroynd, at ringja beinleiðis til eina neyðtøkutelefon á Landssjúkrahúsinum at fáa hjálp uttan at skula seta seg í samband við løgregluna fyrst.

**Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum**
Arbeitt verður saman við donskum myndugleikum um at yvirtaka farsóttarmálsøkið. Lógaruppskot um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum verður lagt fyri Løgtingið í komandi tingsetu. Tá ið ein farsótt herjar, skulu skjótar avgerðir takast. Mett verður, at tað er neyðugt, at avgerðarmyndugleikin í farsóttarmálum er tætt við, har avgerðir verða tiknar.

**Dagføra danska heilsulóggávu í Føroyum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at dagføra so stóran part av donsku heilsulóggávuni sum gjørligt í hesum samgongutíðarskeiðnum. Hetta arbeiðið gongur væl. Fleiri lógir eru longu dagførdar, og arbeitt verður við at dagføra aðrar.

## UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁL

### Útbúgvingarmál

**Dagstovnaøkið**
Neyðugt er við átøkum til at minka um starvsfólkatrotið á dagstovnaøkinum. Til dømis verður námsfrøðiútbúgving umskipað í tvær leiðir. Farið verður undir at útbúgva námsfrøðingar beinleiðis til dagstovnaøkið. Á heysti 2023 verða tveir flokkar tiknir inn á námsfrøðiútbúgvingina á Setrinum.

Komandi heyst verður nýtt dagstovnaráð valt, ið m.a. kann vegleiða viðvíkjandi at seta í verk námsfrøðiligu stevnumiðini frá 2016 og í sambandi við ætlanina at endurskoða dagstovnalógina og at tryggja bestu yvirgongd frá dagstovni til skúla.

**Fólkaskúlin**
Arbeiðsbólkur og politiskur fylgibólkur er settur at endurskoða fólkaskúlalógina. Miðað verður ímóti at dagføra fólkaskúlalógina, so hvørt sum arbeiðið verður liðugt.

Farið er undir at viðgera hesi øki: Tíma- og lærugreinabýtið, bæði skipanina og lutfallið millum hugvísindaligu lærugreinarnar, náttúruvísindaligu lærugreinarnar og handaverk og list. Eisini verður arbeitt við floksstødd, serliga við atliti at byrjanarundirvísingini, har tað kann vera sera trupult at skipa eina undirvísing, sum hevur fyrilit fyri einstaka næminginum, tá ið ov nógvir næmingar eru í hvørjum flokki. Harumframt verður  arbeitt við at gera eina skipan fyri skúladagin, sum er rættiliga drúgvur samborið við hini Norðurlondini.

Onnur evni, sum arbeiðsbólkurin skal viðgera, eru m.a. føroyskt sum annaðmál, serøkið, flokslærara-skipanin, skúlaaftran, lívsmeistran og stuðul og hjálp hjá næmingum, ið eru lesi- og skriviveikir.

**Sernámsøkið**
Ein óheft kanning er sett í verk av sernámsfrøðiligu tænastunum í fólkaskúlanum. Henda kanning er partur av eini størri ætlan. Miðað verður ímóti, at arbeiðið at endurskoða fólkaskúlalógina gongur hond í hond við arbeiðið at tryggja sernámsfrøðiliga økið.

Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin sett ein arbeiðsbólk við umboðum úr heilsu-, almanna- og undirvísingarverkinum at orða ítøkilig boð upp á átøk, sum kunnu menna møguleikarnar hjá avvarðandi skipanum at samstarva, so at børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum mennast og læra í fólka-

skúlanum. Sama arbeiði er gjørt viðvíkjandi ungum við sálarligum og sosialum avbjóðingum, og verksetingin av tilmælunum er farin í gongd.

At loysa avbjóðingarnar hjá børnum og ungum við mál- og samskiftistrupulleikum verður raðfest. Hetta er tvørgeiraligt arbeiði, har dentur verður lagdur á at hoyra allar partar.

**Miðnámsskúlaøkið**
Arbeiðið at endurskoða útbúgvingarnar til maskinsmið og til rør- og blikksmið er komið á mál, og broytingarnar fara at styrkja yrkisførið á hesum útbúgvingum.

Á Miðnámsskúlanum í Vestmanna sleppa teir fyrstu næmingarnir inn á nýggju alaraútbúgvingina í august.

Á Glasi í Havn byrjar nýggja 3-ára skapandi fyrireikingarbreytin, ið fer at leggja seg eftir tvørfakligum samstarvi millum gymnasialar- og yrkisrættaðar lærugreinar, serliga innan fyri tilvirkis- og klædna-atstøði. Við hesum verða lunnar lagdir, ið kunnu gera tað møguligt at samantvinna yrkisútbúgvingar og gymnasialar útbúgvingar.

Á Tekniska Skúla í Klaksvík verður seinasta hond løgd á seinasta part av kokkaútbúgvingini, sum væntandi byrjar í januar 2023.

Á Heilsuskúlanum í Suðuroy er ein nýggj leið løgd inn til útbúgvingarnar sum heilsuhjálpari og námsfrøðihjálpari. Umvegis førleikameting kunnu ófaklærdir heilsuhjálparar og námsfrøðihjálparfólk oman fyri 25 ár við viðkomandi starvsroyndum fáa eina høgligari leið gjøgnum útbúgvingina.

Landsstýrið heldur, at førleikametingin kann gerast ein týdningarmikil liður í eini røð av átøkum, sum skal fáa fleiri vælútbúgvin starvsfólk inn á vælferðaøkið, við virðing fyri teirra royndum. Fyrsta stigið er heilsuhjálparar og námsfrøðihjálparar. Næsta stigið verður heilsurøktarin.

Arbeiðsbólkur er farin undir at lýsa eina kt-support yrkisútbúgving við føroyskari skúlagongd.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Arbeitt verður við eksternari eftirmeting av Fróðskaparsetrinum, og frágreiðing frá eftirmetingar-bólkinum verður latin Uttanríkis- og mentamálaráðnum við árslok 2022.

Arbeiðið við einum føroyskum førleikakarmi heldur fram. Tað er fortreyt fyri at lúka krøvini í Bologna-avtaluni, sum tryggjar Fróðskaparsetri Føroya altjóða góðkenning.

Í februar tók Fróðskaparsetrið inn eyka flokk við 25 lesandi til sjúkrarøktarfrøði, sum merkir, at sjúkrarøktarfrøðilesandi nú verða upptikin á útbúgvingini tvær ferðir árliga. Avgjørt er at taka lesandi inn til kt-bachelor á hvørjum ári, umframt at fara undir masterútbúgving í kt.

Samstarvsráð er sett fyri útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya, sum virka á vælferðarøkinum, sum fevnir um sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina, námsfrøðiútbúgvingina og læraraútbúgvingina. Samstarvsráðini eru sett fyri at styrkja og tryggja samanhangin millum útbúgvingarnar og fakøkini, sum útbúgvingarnar fevna um.

Í mars í ár góðkendi danska Løgmálaráðið føroysku løgfrøðiútbúgvingin á Fróðskaparsetri Føroya sum úrslit av einum drúgvum samskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar.

**Kampus**

Arbeitt verður við at menna eina byggiskrá, soleiðis at arkitektakappingin um høvuðsbygningin og framtíðarútbygging av Fróðskaparsetrinum kann skrivast út í heyst. Hartil verður arbeitt við at yvirtaka allan Venjingarskúlan frá Tórshavnar kommunu og flyta øll í Sjóvinnuhúsinum niðan í Venjingarskúlan. Hetta krevur, at Venjingarskúlin verður høvuðsumvældur og dagførdur til nútímans brúk. Metti kostnaðurin fyri hetta arbeiði er 144 mió. kr., ið skal játtast fram til 2028, tá ið Venjingarskúlin skal vera liðugt høvuðsumvældur.

**Gransking**

Í lógini fyri gransking, menning og nýskapan er ásett, at faknevndir verða settar, sum veita stuðul til gransking. Fyrsta faknevnd av hesum slagi er sett undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum og hevur síðan stovnanina í juli í fjør latið stuðul til 19 granskingarverkætlanir.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskipan er sett og skal ráðgeva og vegleiða landsstýrið og vinnuna við einum felagspolitikki galdandi fyri gransking, menning og nýskapan.

**Frítíðarundirvísingin, háskúlar og eftirskúlar**

Ein útbúgvingarskipan í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin er fyriskipað, og arbeitt verður við at implementera hana um alt landið. Tí er serlig eftirútbúgving byrjað á Fróðskaparsetrinum fyri lærarar í føroyskum sum annaðmál.

Nýggjur háskúli byrjar í Nesvík í heyst. Arbeitt verður við hølisumstøðunum hjá Ítróttaháskúlanum í Vági, og farið verður ætlandi undir at byggja nýggjan húsarhaldskúla í Klaksvík.

**KT-heildarætlan**

Arbeiðið við at menna og seta í verk kt-heildarætlan fyri alt undirvísingarverkið heldur fram. Játtaðar eru 40 mió. kr. í eitt 5 ára tíðarskeið frá 2021 til 2024 til hetta endamálið.

**Rásin**

Fyrireikingarnar av verkætlanini at víðka og betra um karmarnar hjá Rásini í Saltangará eru í gongd. Høvuðsprosjektið er liðugt, og næsta stig er at bjóða verkætlanina út. Tá ið útboðið er av og útboðsvinnari funnin, verður kostnaðurin kendur, og verklagslóg verður tá løgd fyri Løgtingið. Ætlandi verður byggingin liðug í 2024.

**Miðnám á Kambsdali**
Løgtingslóg um triðja byggistig í um- og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali er samtykt. Triðja byggistig fevnir um at nýbyggja náttúruvísindaliga økið og útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhøli. Landsverk arbeiðir við at bjóða verkætlanina út, og eftir ætlan skal byggingin byrja í fjórða ársfjórðingi 2022. Byggingin væntast liðug í 2025.

## Mentamál

**Kringvarp Føroya**
Arbeitt verður við uppskoti til nýggjan sáttmála um publicservice. Miðað verður ímóti orðaskifti í Løgtinginum í komandi tingsetu, soleiðis at nýggi sáttmálin kann koma í gildi 1. januar 2023.

**Miðlastuðul**
Nýggj kunngerð og nýggj skipan við verkætlanarstuðli kom í gildi 1. jan. í 2022, og Miðlastuðulsnevndin er farin at virka eftir nýggju skipanini.

**Nýggj barnaváttanarlóg**
Tann 1. juni 2022 kom nýggj lóg um barnaváttanir í gildi. Lógin setir m.a. sum treyt fyri starvssetanir, ið umfata beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, at arbeiðsgevari fær til vegar barnaváttan frammanundan. Eisini er gjørd vegleiðing til lógina í samráð við fútan, Dátueftirlitið og Undirvísingarstýrið.

**Tjóðleikhúsið**
Á vári 2021 varð kapping um staðseting av nýggja Tjóðleikhúsinum, og niðurstøðan varð, at húsið skal byggjast á Eystaru Bryggju í Havn. Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina heildarætlan fyri eystara havnarøki, og ætlanin er at seta 4.000 fermetrar av til nýggja Tjóðleikhúsið, á leið har Farstøðin er í dag. Ein arkitektakapping varð boðin út í mai í ár, og evsta freist fyri at lata kappingaruppskot inn er 25. august 2022.

Eisini verður lógin um Tjóðpall og stuðul til yrkisleiklist v.m. endurskoðað. Arbeiðsbólkur við umboðum fyri ráðið og tað yrkisleiklistaliga umhvørvið fer komandi setu at lata landsstýrismanninum tilmæli.

**Hjálparpakkar á mentanarøkinum**
Fimm hjálparpakkar eru samtyktir í sambandi við Covid-19. Væntað verður ikki, at neyðugt verður við fleiri hjálparpakkum.

**Føroyskar ljóðbøkur**
Arbeitt verður við tøkniligum loysnum og fíggjarligum avtalum, ið loyva bókasøvnunum at læna út føroyskar ljóðbøkur umvegis heimasíður teirra. Arbeiðið hongur saman við nýggju bókasavnslógini.

**Koltursætlanin**
Koltursætlanin fevnir um varðveiting og nýbygging av býlingum í Koltri og um at endurskapa upprunaligu náttúruna í Koltri. Í vár samtykti Løgtingið heimild til, at landið fíggjar 9 mió. kr. av Koltursætlanini, tó treytað av, at Tjóðsavnið fær uttanhýsis fígging til restina av Koltursætlanini, sum í alt er mett at kosta 65 mió. kr. Tá ið øll fíggingin er komin upp á pláss, kann verkætlanin verða skipað við eini verklagslóg.

**Føroyski báturin tilnevndur UNESCO-listan yvir siðaarv**
Føroysk feløg, søvn og bátasmiðir hava í fleiri ár arbeitt saman við norðurlendskum áhugafeløgum, søvnum og bátasmiðum um eina felags norðurlendska tilnevning av norrøna súðubygda bátinum til UNESCO-listan yvir umboðandi siðaarv. Báturin kom á listan tann 14. desember 2021.

**Bakkaverjur at verja fornminni**
Arbeiðið við bakkaverju at verja fornminnini kring landið, sum Tjóðsavnið og Landsverk standa fyri í felag, heldur fram í komandi ári. Arbeiðið við bakkaverju í Kirkjubø er umfatandi og fevnir um nýggjan og breiðari verjumúr framman fyri Ólavskirkjuni, verjugrót fram við vegnum niðan fyri Kirkjubømúrin og víðari fram við bakkanum út til Líkhús og umvæling av verjumúrinum har.

Á Sondum á Sandi er ein fyribils verja gjørd av bakkanum, og á Bønhúsfløtti í Hvalba verður arbeitt við uppmáting av fornminnunum har.

**Ítróttur**
Arbeitt verður framhaldandi fyri at stuðla ÍSF í strembanini eftir føroyskum limaskapi í altjóða olympisku nevndini IOC. Landsstýrið stuðlar eisini ÍSF í at fáa Oyggjaleikirnir til Føroya í 2031. Somuleiðis vil samgongan stuðla føroyskum limaskapi í millumtjóða ítróttafelagsskapum og kappingum. Eisini hevur ÍSF fingið endaliga góðkenning sum dopingeftirlit.

**Listasavnið**
Í vetur varð nýggjari parturin av Listasavni Føroya umvældur, og næsta stigið verður at fyriskipa arbeiðið við eldra partinum av Listasavninum, har tørvur er á umfatandi dagføringum.

**Broyting í kunngerð um bygningar fólkakirkjunnar**
Gjørd er broyting í kunngerð um bygningar fólkakirkjunnar, so at bygningar eldri enn 100 ár kunnu umvælast eftir ummæli frá Tjóðsavninum. Frammanundan skuldi Tjóðsavnið góðkenna tílíkar umvælingar. Mett varð ikki, at kunngerðin samsvaraði á hesum øki við heimildarlógina.

**Kunngerð um samsýning til kirkjutænarar og hjálparfólk**
Kunngerðin skal skapa tryggari og meira nágreiniligar innihaldsligar og fyrisitingarligar karmar um tey føri, tá ið kirkjutænarar og hjálparólk verða samsýnd fyri tænastuna, eins og tá ið tey (í hendinga føri) verða lønt fyri arbeiði.

## Uttanríkismál

### Kríggj í Ukraina: ein nýggjur trygdarpolitiskur samanhangur

Síðan Russland framdi ólógligu innrás sína í Ukraina í februar gongur enn einaferð sjón fyri søgn, at trygd, tryggleiki ella friður ikki eru sjálvsøgd í heimspolitikki. Heldur ikki í Evropa.

Atgerðir Russlands móti Ukraina, og kríggið, tær hava elvt til, skilamarka eitt trygdarpolitiskt vegamót. Valla hevur trygdarpolitiska støðan í Evropa verið so álvarsom síðan seinna heimsbardaga. Alt bendir á, at trygd og verja aftur fara at standa ovarlaga á breddanum.

Í hesum samanhangi hevur samanhald avgerandi týdning. Saman við flest øllum londum í Evropa og eini røð av samsintum londum hava Føroyar sett avmarkandi tiltøk í verk til tess at leggja trýst á Russland at steðga krígnum og taka seg aftur úr Ukraina. Harumframt hava Føroyar latið dyrnar upp fyri fólkum, ið eru rýmd undan krígnum, og landsstýrið hevur latið lutfalsliga stórar upphæddir í neyðhjálp.

Atgerðir Russlands móti Ukraina hava ikki havt beinleiðis ávirkan á trygdarpolitisku støðuna um okkara leiðir. Men til tess at ræða Russland frá at halda fram við líknandi atgerðum ímóti øðrum londum og serliga londunum í NATO verða nýggj verjupolitisk átøk sett í verk um alt Evropa. Væntandi eisini í Norðuratlantshavi og í Arktis.

Í hesum samanhangi er umráðandi, at Føroyar eru tilvitaðar um trygdar- og verjupolitikk og eru sinnaðar at gera sítt fyri, at trygd og støðufesti valda. Landsstýrið raðfestir økið og skal vera við í øllum avgerðum, tilgongdum og ætlanum, sum hava týdning fyri trygd og verju í Norðuratlantshavi og í Arktis. Samstarvið við donsku verjumyndugleikarnar er munandi økt seinnu árini, og ætlanin er eisini at menna samskiftið við NATO, USA og grannalondini Bretland, Noreg og Ísland um verjupolitisk viðurskifti.

Eftir ætlan verður eitt uppskot til samtyktar um trygdarpolitisku mál Føroya lagt fyri Løgtingið í november.

### Lofteftirlitsradari

Í juni undirritaðu landsstýrismaðurin og danski verjumálaráðharrin semju um fortreytirnar fyri at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum. Ein tílíkur eftirlitsradari ber í sær, at fremmand flogfør ikki kunnu flúgva ósædd í luftrúminum yvir Føroyum, og hevur strategiskan týdning fyri ta felags verju, sum NATO stendur fyri um okkara leiðir.

### Arktis

Arktis hevur higartil verið friðhalgað til samstarv um burðardygga menning og loysnir á stóru avbjóðingunum av veðurlagsbroytingum.

Nú er støðan ein onnur orsakað av atgerðum Russlands móti Ukraina. Fleiri týðandi millumtjóða samstarvsfora í hesum øki hava steðgað á og fyribils niðurlagt samstarvið við Russland, harímillum Arktiska Ráðið.

Geopolitiska støða Føroya sum land í Arktis er styrkt seinru árini og við henni eisini okkara ábyrgd saman við okkara sameintu at tryggja frið og styrkja tilverugrundarlagið hjá okkum, ið búgva her um leiðir.

Tí er økt millumtjóða samstarv hornasteinurin í arktiska politikkinum fyri Føroyar komandi árini. Stevna Føroya í Arktis er at virka fyri at mótvirka veðurlagsbroytingum og troyta teir mongu vakstrarmøguleikar, sum vit síggja fyri okkum sum stórhavstjóð í norðurhøvum og Arktis. Landsstýrið arbeiðir somuleiðis við at orða ein nýggjan arktiskan politikk, ið væntandi verður almannakunngjørdur í heyst.

**Handil við umheimin**

Fyri at tryggja føroyskum vørum eins góðar ella betri fortreytir enn okkara kappingarneytar, er av stórum týdningi, at tollur og aðrar handilsligar forðingar verða burturbeindar. Landsstýrið arbeiðir miðvíst við at betra um hesar fortreytir fyri okkara vinnulív. Serliga hava fríhandilsskipanir við ES, Kina, Japan og Suðurkorea høga raðfesting.

**Ísrael**

Sendistova Føroya í Ísrael varð sett á stovn í Tel Aviv í januar 2021. Arbeitt verður millum annað við at skapa vinnulig sambond millum føroyskar og ísraelskar fyritøkur. Eisini verður kannað, hvussu bæði londini kunnu samstarva um nýmenning. Sum liður í at styrkja samstarvið vinnuliga og politiskt varð skipað fyri eini vinnuferð til Ísraels í vár. Samstundis varð eisini skipað fyri hátíðarhaldi í sambandi við, at føroyska sendistovan er latin upp.

**ES**

Landsstýrið vil menna eitt sterkari og meira fjøltáttað samstarv við ES. Ítøkiliga verður arbeitt við nýggjum samstarvskarmi millum partarnar, ið skal tryggja eitt tættari og meira skipað samstarv, bøta um handilsviðurskiftini og geva møguleikar at víðka samstarvið til onnur øki. Formligt samskifti hevur verið millum løgmann og og ES-nevndarforkvinnuna um hesi viðurskifti. Samskiftið er jaligt, og ES tykist veruliga sinnað at styrkja um viðurskiftini við Føroyar.

Sum liður í at styrkja samstarvið og økja vitanina um Føroyar í ES-skipanini verður eisini miðað ímóti at fáa sett ein nationalan serfrøðing í føroyskum viðurskiftum í starv í ES-kervinum seinni í ár.

Í mai undirritaðu Føroyar og ES sáttmála um luttøku Føroya í samstarvsætlanum hjá ES, sum m.a. tryggjar, at føroyski atlimaskapurin í samstarvsætlanini fyri gransking og menning hjá ES, Horizon Europe, heldur fram. Sáttmálin gevur somuleiðis Føroyum møguleika at gerast partur av teimum samstarvsætlanum hjá ES, ið loyva atlimaskap fyri lond uttanfyri ES.

**Japan**
Í apríl undirritaðu Føroyar og Japan samstarvsyvirlýsing, sum hevur til endamáls at skipa ein formligan karm fyri samstarvið millum Føroyar og Japan. Føroyar hava í fleiri ár virkað fyri at styrkja samstarvið við Japan, serliga á handilsøkinum. Samstarvsyvirlýsingin er eitt týdningarmikið fet á hesi leiðini, eisini fyri samstarvið um mentan, útbúgving og gransking.

**USA**
Í november 2020 undirritaðu umboð fyri amerikansku stjórnina og landsstýrið partalagsyvirlýsing, ið hevur til endamáls at skipa ein formligan karm til tess at styrkja samstarvið millum USA og Føroyar. Síðani hevur tætt samskifti verið við USA um samstarv viðvíkjandi vinnu, gransking, útbúgving og mentan. Við støði í partalagsyvirlýsingini verður miðað ímóti at hava fund millum partarnar seinni í ár, annaðhvørt á embætis- ella ráðharrastigi. Arbeitt verður nú við at lata føroyska sendistovu upp í Washington DC.

**Norðurlandamál**
Fyri at styrkja um støðu Føroya í norðurlendska samstarvinum og fyrireika okkum til fullgildigan limaskap í Norðurlandaráðnum og Norðurlanda Ráðharraráðnum er fullgildigur limaskapur fingin til vegar í Nordisk Eneregiforsking (NEF) fyrr í ár. Arbeitt verður somuleiðis við at fáa fullgildigan limaskap í NordForsk og øðrum norðurlendskum stovnum.

Norðurlendsku stjórnarleiðararnir komu í fjør ásamt um, at Norðurlondini skuldu styrkja samstarvið um m.a. veitingartrygd og tilbúgving. Norðurlendsku samstarvsráðharrarnir hava síðani arbeitt við at kortleggja økið, og koma við uppskotum um, hvussu Norðurlondini skulu samstarva fyri at vinna á alskyns kreppum.

**Menningarsamstarv og neyðhjálp**
Tørvurin á humaniterum virksemi hevur ongantíð verið størri í heiminum enn í dag. Samstundis sum títtleikin av náttúruvanlukkum veksur støðugt, økist hóttanin ímóti friði í heiminum alsamt. Tí er at fegnast um, at Løgtingið hækkaði játtanina til menningarsamstarv og neyðhjálp, so at Føroyar kunnu taka størri ábyrgd í altjóða samfelagnum og vera við til at menna og hjálpa, har tørvur er.

## ALMANNA-, JAVNSTØÐU-, FAMILJU- OG BÚSTAÐARMÁL

### <u>Almannamál</u>

**Hjálp til fíggjarliga sperdar familjur**
Hækkingin í prístalinum hevur verið óvanliga stór í 1. og 2. ársfjórðingi í 2022, og rakar breitt og ymiskt og ávirkar fíggjarligu umstøðurnar hjá flestu húskjum. Nøkur húski verða tó rakt harðari enn onnur. Ein høvuðsorsøk til samlaðu hækkingina í prístalinum er hækkingin í prísi á brenniolju til húsarhald.

Tað hevur týdning undir tílíkum umstøðum, at landið ikki stimbrar búskapin óneyðugt og økir um eftirspurningin, tí tað kann fáa øvugtan virknað. Tað hevur týdning, at húsarhaldini so vítt gjørligt sjálvi tillaga seg og umleggja sína nýtslu eftir broyttu umstøðunum. Húski, sum eru bundin at útreiðslum, og sum hava lágar inntøkur hava avmarkaðar møguleikar at tillaga seg, og tí ynskir landsstýrið at veita eina hjálpandi hond til tey, sum eru ringast fyri.

Ætlanin er at leggja uppskot fram um at veita fíggjarligan stuðul til húski við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, og sum brúka olju til upphiting av bústaðnum. Ítøkiliga er ætlanin at lata eitt ískoyti á 7.000 kr. til hesi húski.

Hetta verður gjørt við eini broyting í lógini um familjuískoyti, soleiðis at t.d. persónur uttan børn og við einari inntøku á í mesta lagi 290.000 kr. um árið kann fáa hetta eingangsískoytið. Uppskotið verður lagt fyri tingið fyrst í september, og fær virknað so skjótt uppskotið er samtykt.

**Almannapensjónslógin**

Tað kemur javnan fyri, at pensjónistur fær eftirrokning, tí hann hevur fingið ov nógv útgoldið í fólkapensjón. Tað er ásett í lóg, at pensjón sambært almannapensjónslógini eina ferð um árið verður eftirroknað, og at kannast skal eftir, um pensjónisturin hevur fingið ta pensjón, ið hann hevur rætt til. Umframt at tað er óheppið fyri ein pensjónist at fáa eftirrokning, sum í nøkrum førum er fleiri túsund krónur, so er eisini talan um eina umsitingarliga tunga skipan.

Ætlanin er at broyta almannapensjónslógina soleiðis, at pensjónin hvønn mánað verður ásett við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Við broytingini verður pensjónin javnað so hvørt, tá ið inntøkuviðurskiftini hjá pensjónistunum broytast, og samstundis slepst undan trupulleikanum við stórum eftirrokningum til pensjónistar.

Eisini er neyðugt at laga almannapensjónslógina soleiðis til, at hon verður í samsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd. Tørvur er á at fáa greiðari reglur um rættin til at vinna inn almannapensjón, hjá persónum, ið umframt Føroyum, hava búð og arbeitt í øðrum londum.

**Dagpeningaskipanin**

Arbeitt verður við við at endurskoða dagpeningalógina. Arbeiðið verður gjørt í stigum, og fyrsti partur varð rokkin fyrr í ár, tá ið Løgtingið samtykti eina røð av betringum – m.a. at fólk við álvarsligari sjúku kunnu fáa dagpening í longri tíð, og fólk við útsettari pensjón, nú eru fevnd av dagpeningaskipanini.

Næsti partur av endurskoðanini snýr seg um at bøta um treytirnar hjá smærri privatum arbeiðsgevarum, ið hava starvsmenn í starvi. Hesir arbeiðsgevarar hava skyldu at rinda fulla løn í sambandi við sjúku. Starvsmaður hevur rætt til løn frá fyrsta fráverudegi, líka til viðkomandi verður sagdur úr starvi. Fyri arbeiðsgevaran kann tað sostatt verða ein fíggjarligur smeitur, tá ið løntakari verður sjúkur ella langtíðarsjúkur. Ætlanin er at broyta løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. soleiðis, at smærri privatir arbeiðsgevarar, ið hava starvsmenn í starvi, so ella so verða fevndir av dagpeningaskipanini.

**Eftirmeting av heimatænastu og eldrarøkt – uppfylging**
Tað er í hesum samgonguskeiði framd ein eftirmeting av eldraøkinum, ið varð liðug í desember 2021. Arbeiðið at gera broytingar í kunngerðini um gjald fyri heimatænastu og eldrarøkt o.a. er farið í gongd. Somuleiðis er ætlanin at broyta kunngerðina um samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum heima.

Gjøldini fyri tænasturnar, sum kommunurnar veita borgarum, og ansingarsamsýningin eru ikki broytt, síðan eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita, og hevur tað verið eitt ynski frá kommunum at fáa upphæddirnar broyttar.

**Brekumboð**
Breksáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar í 2009. Endamálið við sáttmálanum er at virka fyri, at borgarar, ið bera brek, verða virdir sum javnbjóðis borgarar í einum rættarsamfelag, og til fulnar kunnu nýta øll grundleggjandi manna- og frælsisrættindi á jøvnum føti við onnur.

Í samsvari við Breksáttmálan er ætlanin at gera reglur um eitt brekumboð, sum skal kunna virka óheft og hava eftirlit við, at breksáttmálin verður settur í verk í Føroyum. Harumframt er ætlanin, at brekumboðið eisini skal hava ein upplýsandi leiklut um rættindi hjá fólki, ið bera brek. Arbeiðið við at seta eitt brekumboð verður gjørt í samráð við MEGD.

Arbeiðið við uppskoti um løgtingslóg um brekumboð er farið í gongd, og lógin verður eftir ætlan løgd fyri tingið í hesi tingsetu.

**Tann góða tilgongdin**
Í samgonguskjalinum er ásett, at “Tann góða tilgongdin” skal endurskoðast og mennast.

Arbeiðið við at eftirmeta ta góðu tilgongdina er farið í gongd. Arbeiðssetningur er gjørdur, og arbeiðsbólkur og stýrisbólkur eru settir. Eftirmetingin verður gjørd saman við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Kommunufelagnum og Autismufelagnum.

Borgarar, sum bera brek, hava ofta tørv á tænastum frá nógvum ymiskum stovnum og myndugleikum. ”Tann góða tilgongdin” er ein skipaður tvørgeiraligur og tvørfakligur samstarvsleistur, sum hevur til endamáls at samskipa tænastur frá ymiskum myndugleikum saman við familjum, sum hava barn við autismu, so at gerandisdagurin hjá familjunum verður lættari.

Ein liður í eftirmetingini er at koma við tilmæli um, hvussu “Tann góða tilgongdin” kann víðkast til at fevna um borgarar, sum bera onnur brek.

**Barnaverndarlógin**
Ætlanin er framhaldandi at arbeiða við at menna barnaverndarøkið og barnaverdarstovnarnar undir Almannaverkinum grundað á frágreiðingina frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 2020. Harumframt

er ætlanin at dagføra barnaverndarlógina, m.a. viðvíkjandi rættinum til ókeypis umboðan, fosturforeldraskipanini og tíðarfreistir í sambandi við § 45-kanningar, umframt ymiskar lógartekniskar broytingar.

**Almannalógin**
Almannalógin er nú broytt soleiðis, at foreldur, sum missa eitt barn yngri enn 18 ár ella fáa eitt barn, ið er deyðføtt, fáa rætt til at syrgja í frið. Við broytingini fáa foreldur rætt til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í 26 vikur í part, um ólukkan rakar og barn teirra doyr. Broytingin kemur í gildi 1. januar 2023.

**Javnstøða**

**Javnstøðumál**
Tað er umráðandi at økja um vitanina um tær avbjóðingar á javnstøðuøkinum, sum eru í okkara samfelag. Arbeiðsmarknaðurin, nevndir, leiðslur og útbúgvingarøkið eru á nógvum økjum sera kynsbýtt. Somuleiðis hevur tað týdning, at vit savna okkum hagtøl og vitan um kyn, soleiðis at vit vita hvørjar avbjóðingar serliga eru, og hvar tær eru, tá ið vit skulu arbeiða við upplýsing og loysnum.

Javnstøðulógin skal tryggja, at vit hava røttu karmarnar at virka eftir, tá ið arbeitt verður við málsviðgerð, kærum, eftirliti og upplýsing. Ætlanin er tí at endurskoða og dagføra Javnstøðulógina við tí í hyggju at bøta um ávís viðurskifti til tess at tryggja greiðari ásetingar í sambandi við heimildirnar hjá Javnstøðunevndini. Harumframt verður leiðbeining gjørd, sum skal tryggja góðar karmar fyri málsviðgerð hjá Javnstøðunevndini.

Fyrimunir við at arbeiða við javnstøðu eiga at síggjast aftur á kjarnuøkjum, so sum umsorgan, umhvørvi og umboðan í okkara samfelag. Tí verður framhaldandi arbeitt við at økja um javnari politiskari umboðan, sum er ein fortreyt, um arbeiðið við javnstøðu fyri allar borgarar í Føroyum veruliga skal bera nakran veg.

**Harðskapur í parlagi og nærsambondum**
Arbeiðið at basa harðskapi og ágangi heldur fram. Heildarætlanin um harðskap í parlagi og nærsambondum og Heildarætlanin um kynsligan ágang eru eftirmettar. Ætlanin er at gera eina nýggja Heildarætlan um harðskap í parlagi og nærsambondum, har hildið verður fast í sama leisti, men við nýggjum átøkum, ið eru lagað til tær broytingar, sum hava verið í samfelagnum.

Sum partur av harðskapsverkætlanini "Sig frá" hevur seinastu árini verið arbeitt við at skipa eitt móttøkuhús fyri harðskapsrakt. Móttøkuhúsið skal virka sum ein miðstøð, ið samskipar ráðgeving og vegleiðing til fólk, ið eru fyri harðskapi, soleiðis at tey verða stuðlað at byrja eina tilgongd burtur úr harðskapinum. Almannamálaráðið hevur í tøttum samstarvi við Kvinnuhúsið fyrireikað málið, peningur er settur av á fíggjarlógini, og klárt verður at fara undir virksemið eftir summarfrítíðina.

## Familjumál

**Foreldramyndugleikalógin**

Í mai í ár samtykti Løgtingið einmælt nýggja foreldramyndugleikalóg. Við nýggju lógini verða rættindi hjá barninum tryggjað og styrkt. Tryggjað verður, at allar avgerðir verða tiknar við atliti at barnsins besta, og at fyrilit skal takast fyri sjónarmiðunum hjá barninum.

Lógin leggur upp fyri betur at tryggja rættindini hjá barninum til bæði foreldrini, og ógift foreldur fáa betri møguleika til at fáa felags foreldramyndugleika.

Sum nakað nýtt kann myndugleikin taka avgerð um bústaðin hjá barninum og felags foreldramyndugleika. Harafturat verður møguligt at seta í verk barnaserkøna kanning við ummæli frá serkønum um foreldrini.

**Pengarnir fylgja barninum**

Sum ásett í samgonguskjalinum verður arbeitt við at broyta dagstovnalógina, so heimilað verður kommununum at rinda part av kostnaðinum fyri stovnspláss til foreldur, um tey velja at ansa egnum børnum heima. Væntandi verður eitt lógaruppskot lagt fyri tingið í hesari tingsetuni.

## Bústaðarmál

**Langtíðarætlan um at byggja vardar bústaðir komandi árini**

Tørvurin á vardum bústøðum er stórur, og bíðilistin gerst alsamt longri. Arbeitt verður tí við eini langtíðarætlan, um hvørjar bústovnar, virknistilboð og umlættingartilboð skulu byggjast komandi 10 til 15 árini. Fyri at gagnnýta starvsfólkaorkuna og fáa ein skynsaman rakstur er neyðugt at byggja størri og fakliga sterkari stovnar, sum eisini hava góðar fysiskar karmar, ið fremja trivnað hjá búfólkum, starvsfólkum og avvarðandi.

Neyðugt er at økja um talið á búplássum munandi, samstundis sum umlættingar- og virknistilboð eisini eiga at økjast, so at fólk kunnu búgva heima, so leingi tey vilja tað. Tað er ein fyrimunur at hava breiða politiska semju tvørtur um floksmørk, um hvørjar vardar bústaðir verða bygdir komandi 10 til 15 árini. Hetta er eitt ynski frá avvarðandi og áhugabólkum, samstundis sum hetta er ein fyrimunur í sambandi við fyrireikingarnar at byggja vardar bústaðir, soleiðis at óneyðugir steðgir ikki koma í byggifyrireikingarnar.

**Byggiverkætlanir at byggja vardar bústaðir, ið eru í gongd**

Løgtingið samtykti einmælt í apríl 2022 at fara undir at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, ið verður bygt í Reynstúni á Argjum. Sambýlið hevur 18 búpláss umframt felagsøki og starvsfólkarúm. Fyrsti spakin bleiv settur í síðst í juni í ár, og sambært tíðarætlanini verður klárt at flyta inn síðst í 2023.

Í løtuni byggir Landsverk vegna Almannamálaráðið tveir vardar bústaðir, og farið verður undir tann triðja í næstum. Heimið í Havn til børn og ung við autismu, ið verður bygt í Kvíggjartúni á Argjum, fer at hava seks búpláss, seks umlættingarpláss og eitt virknistilboð til 16 børn og ung. Sambært dagførdu tíðarætlanini verður byggingin liðug í mars 2023. Sambýlið til fólk við menningartarni, ið verður bygt á Mýrini í Hoyvík, fer at hava 18 búpláss. Klárt verður at flyta inn síðst í ár.

Landsstýrismaðurin hevur fingið undirtøku í landsstýrinum fyri at fara undir fyrireikingar at byggja eitt sambýli til vaksin fólk við autismu. Uppskot til verklagslóg verður ætlandi lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

Í juni 2020 samtykti løgtingið løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum, ið hevur til endamáls at dagføra verandi bústovnar fyri í mesta lagi 33 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2020-2023. Arbeiðið hevur havt nakrar avbjóðingar við sær bæði viðvíkjandi tíðarætlan og hækkandi prísum. Talan er um áleið 15 ymiskar verkætlanir, sum skulu fremjast í tíðarskeiðinum. Av hesum eru seks verkætlanir lidnar, ella um at vera lidnar. Dagføringin heldur fram í 2022 og 2023 sum ætlað.

**Bústaðir**

Fleiri verkætlanir eru í gongd og fleiri verkætlanir verða fyrireikaðar. Bústaðir hevur í dag 387 leigumál og gongst sum ætlað, verða 30 nýggj leigumál í ár og við hesum kemur talið upp á 417 í 2022. Eftir ætlan verða 60-70 nýggj leigumál klár at leiga út í 2023. Av hesum er ein verkætlan við 12 íbúðum í Blómubrekku í Tórshavn, sum er í gerð í samstarvi við Almannaverkið og Sinnisbata.

Fleiri verkætlanir, sum eru undir fyrireiking, skulu eftir ætlan bjóðast øðrum íleggjarum at taka lut í. Talan er m.a. um størri verkætlanir í Tórshavn, í Norðragøtu, í Klaksvík, í Vágum, umframt nakrar smærri verkætlanir.

Harumframt er farið undir fyrireikingarnar at byggja búfelagsskapir til serligar málbólkar á Toftum, á Strondum og møguliga í Vágum.

**Dagføring av leigulógini**

Leigumarknaðurin er nógv broyttur síðan leigulógin upprunaliga varð gjørd í 2010. Landsstýrismaðurin hevur fingið undirtøku frá landsstýrinum til saman við viðkomandi pørtum at endurskoða lógina við tí fyri eyga at gera dagføringar eftir broyttu viðurskiftunum á leigumarknaðinum og í samfelagnum annars.

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁL

**Orku- og veðurlagspolitikkur 2022-2032**

Í vár samtykti Løgtingið nýggjan orku- og veðurlagspolitikk. Endamálið er, at komandi 10 árini skal útlátið av vakstrarhúsgassum minka í minsta lagi 30 prosent samanborið við útlátið í 2010. Tað merkir, at í 2032 skal útlátið av vakstrarhúsgassi vera minni enn 525.000 tons CO2-eindir í mun til

umleið 750.000 tons CO2-eindir í 2010. Talan er um framsøkið mál, tí hetta svarar til 50 prosent minking í mun til útlátið í 2020, tá ið samlaða útlátið fór upp um 1 mió. tons CO2-eindir. Umroknað til olju merkir hetta, at oljunýtslan skal minka niður í helvt komandi 10 árini. Tað verður ein stór avbjóðing at náa hesum málinum.

Størsta partin av minkingini í útlátinum skulu vit fáa í lag við at fremja grøna orkuskiftið á landi. Málið um 30 prosent minking er í samsvari við grein 3, stk. 1 í Veðurlagssáttmálanum og grein 4 í Parísavtaluni, sum áleggja londunum eftir førimuni at verja veðurlagsskipanina og at áseta so víðtøkin ella ambitiøs mál, sum umstøðurnar í landinum loyva. Mett verður, at Føroyar kunnu seta enn hægri og meiri víðtøkin mál, tá ið brúkiligar og kappingarførar loysnir gerast lættari atkomuligar hjá t.d. skipaflotanum. Neyðugt verður tí regluliga at endurskoða málini.

Sambært tíðarætlanini í samtykta orku- og veðurlagspolitikkinum skulu 23 átøk fyrireikast og setast í verk komandi 3 árini. Hetta merkir, at árini 2022-2025 skulu 12 lógar- og kunngerðaverk smíðast og setast í gildi; reglugerðir og prísskipanir gerast fyri grøna elframleiðslu; landið og kommunurnar gera grønan innkeyps- og ferðslupolitikk; loyvi til vind- og sólorkuframleiðslu verða løgd til rættis við tíðarfestum útbjóðingum; stóru havnirnar fara undir at fyrireika landstreym til skip við bryggju; krøv verða sett til orkuvirkni hjá skipum sambært altjóða IMO-reglum; landið, kommunurnar umframt náttúru- og lendismyndugleikar dagføra regluverkið um býarplanlegging, lendisnýtslu og -skráseting, so ein miðvís ætlan kann gerast at verja vát- og hagalendi.

**Semja við kommunurnar um leiklutin hjá SEV**

Í mars gjørdu landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og kommunurnar, sum eiga SEV, semjuskjal, ið hevur til endamáls at skapa tryggar karmar um framtíðar útbygging av elorkuni á landi. Talan er øðrumegin um at eyðmerkja net- og skipanarberandi tænastur, sum eisini frameftir verða skipaðar í monopolvirkseminum hjá lutafelagnum SEV, og hinumegin um at áseta greiðar reglur fyri kappingarútsett framleiðslu- og søluvirksemi. Á henda hátt fáa vit eina trygga elskipan, har netfelagið SEV tryggjar góðskuna og stýrir skipanini, og fleiri partar kunnu kappast um at framleiða og selja orku úr varandi orkukeldum. Samstundis verður hildið fast við meginregluna um samhaldsfasta prísskipan, soleiðis at goldin verður sami prísur fyri somu elveiting kring alt landið.

Verksetanin av semjuskjalinum krevur á summum økjum neyvari greiningar, og umboð fyri orkumyndugleikan og SEV eru farin undir at greina hesi viðurskiftini. Løgtingslógin um elveiting verður dagførd samsvarandi semjuni við SEV og samsvarandi samtykt løgtingsins um orku- og veðurlagspolitikk 2022-2032.

**Meira elframleiðsla úr vindi**

Eftir at tað í fleiri ár gekk striltið við at fáa økt um elframleiðsluna úr vindmegi, er av álvara komin gongd á seinastu tíðina. SEV tók vindmyllurnar í Porkeri í brúk í fjør, og um stutta tíð verður farið undir at framleiða frá tveimum nýggjum vindmyllulundum oman fyri Havnina. Sjálvt um tað ikki ber til at fullnýta vindframleiðsluna frá fyrsta degi, tí ymiskar skipanir, sum stabilisera streymgóðsk-

una og elnetið, skulu mennast, m.a. pumpuskipan, so fer vindframleiðslan at geva eitt positivt íkast til búskapin hjá SEV longu frá byrjan. Hetta ger seg ikki minst galdandi, nú oljuprísurin er hækkaður munandi.

Elframleiðsla úr vindi er soleiðis við til at minka um trýstið á føroyska elprísin, samstundis sum útbygging av vindorkuni er við til at gera okkum meira sjálvbjargin á orkuøkinum og minkar um útlátið av vakstrarhúsgassi.

**Óljóð frá skipum**
Í fjør gjørdu kommunurnar saman við Umhvørvisstovuni reglugerð um óljóð frá skipum við markvirðum fyri óljóð, sum allar havnir skuldu fylgja. Markvirðini verða stigvíst herd komandi tíðina. Eisini eru ásetingar um mannagongdir, sum allar havnir skulu fylgja, um eitt skip verður víst úr eini havn.

Reglugerðin hevur virkað í nakrar mánaðir. Sum heild taka kommunur/havnarskrivstovur trupulleikan við óljóði í álvara, hóast tað framhaldandi íkoma støður, har borgarar klaga um áhaldandi óljóð, ið eisini liggur omanfyri markvirðini. Vónandi verða nakrir av byrjanartrupulleikunum loystir í hesum árinum, áðrenn kommunurnar og Umhvørvis- og vinnumálaráðið um ársskiftið fara undir at eftirmeta skipanina.

**Broyting í eigaraíbúðarlógini**
Løgtingið samtykti í apríl eina broyting í lógini um eigaraíbúðir, sum javnstillar bygningar, bygdir áðrenn 3. apríl 1970, við yngri bygningar, soleiðis at eldri bygningar nú eisini kunnu leggjast sundur í eigaraíbúðir, um teir annars lúka krøvini.

Fólkavøksturin seinastu árini hevur skapt tørv á fleiri bústøðum og bústaðarmøguleikum. Við lógarbroytingini eru fleiri bygningar, sum kunnu leggjast sundur í eigaraíbúðir. Harvið eru fleiri møguleikar at skipa smærri bústaðareindir, har fólk kunnu seta føtur undir egið borð.

**Betri atgongd til arbeiðsmegi**
Í samgonguskjalinum settu vit okkum fyri, at tað skal verða lættari og skjótari at fáa fatur á tíðaravmarkaðari, útlendskari arbeiðsmegi, tá ið tørvur er á arbeiðsmegi.

Tað er nærum einki arbeiðsloysi í Føroyum, og trot er á arbeiðsmegi bæði í privata og í almenna geiranum. Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum gjørdi tí á heysti 2021 eina avtalu við danska ráðharran í útlendinga- og integratiónsmálum um eina sonevnda fast-track skipan. Nýggja skipanin hevur bøtt munandi um átrokandi tørvin á arbeiðsmegi við at gera tað umsitingarliga lættari at søkja og at seta í starv bæði faklærda og ófaklærda arbeiðsmegi úr triðjalondum. Løntakararættindini á tí væl skipaða føroyska arbeiðsmarknaðinum verða vird í hesari skipanini, og eftirlit verður hildið við, at arbeitt verður eftir føroyskum sáttmálum til føroyska løn og føroyskar arbeiðsumstøður.

Síðani skipanin kom í gildi eru meir enn 90 arbeiðsgevarar undangóðkendir og sløk 300 arbeiðsloyvi eru givin eftir fast-track skipanini.

**Ukrainsk flóttafólk**

Í apríl mánaði samtykti Løgtingið einmælt uppskotið frá landsstýrinum, sum heimilar, at fólk, ið eru rikin úr Ukraina orsakað av kríggi, kunnu fáa uppihaldsloyvi í Føroyum. Hetta er ein varði í føroyskari politiskari søgu, tí hetta er fyrstu ferð, at landsstýrið alment boðar frá, at Føroyar taka ímóti flóttafólkum. Føroyar eru eitt av heimsins ríkastu samfeløgum, og tað er ikki annað enn natúrligt, at vit lata dyrnar upp fyri evropeisku grannum okkara, ið flýggja undan ræðuliga krígnum í Ukraina.

At taka móti flóttafólkum hevur kravt nógvar fyrireikingar. Samstarvið millum m.a. almanna-, skúla-, og heilsuverk, kommunur, løgreglu, útlendingamyndugleikar og Reyða Kross hevur virkað væl, og higartil hava umleið 50 fólk úr Ukraina fingið uppihaldsloyvi í Føroyum. Tey hava fingið bústað í Føroyum, summi eru farin til arbeiðis og onnur eru farin í skúla. Landsstýrið fegnast um, hvussu væl fólk hava tikið ímóti hesum nýggju borgarunum, og um at vinnulívið gevur mongum møguleika á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Eisini teimum, ið ikki enn duga føroyska málið.

**Arbeiðsmarknaðurin**

Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum sjálvir skipa viðurskiftini sínámillum, men karmarnir um føroyska arbeiðsmarknaðin treingja til at verða dagførdir. Tí ætlar landsstýrið í næstum at endurskoða regluverkið á arbeiðsmarknaðinum. Lagt verður fyri við starvsmannalógini, sum er frá 1958 og einans er broytt tvær ferðir; seinast í 1970.

Eisini er ætlanin at endurskoða ALS-lógina. Væntandi fer landsstýrismaðurin í vinnumálum í samráð við ALS-stýrið at leggja uppskot til broytingar í ALS-lógini fram í heyst.

Gongd er sett á arbeiðið at knýta barsilsskipanina at Talgildu Føroyum. Endamálið er at gera tað lættari og smidligari at søkja um barsilspening og at fáa hagtøl um barsilsviðurskifti í Føroyum. Skipanin verður væntandi liðug í 2024.

Í vár varð frítíðarlógin broytt í samráði við fakfeløgini. Endamálið var at gera umsitingina av frítíðarlønini smidligari og ódýrari bæði fyri landið og fyri fakfeløgini. Harumframt varð Frítíðargrunnurin avtikin, og ognin upp á umleið 10 mill. kr. verður flutt Granskingarráðnum til at granska í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum. Á henda hátt verður tryggjað, at ognin í Frítíðargrunninum gagnar løntakarunum.

**Íverksetaraportalurin**

Ein varði varð settur í arbeiðinum at skapa eina samanhangandi vinnuframaskipan, tá ið tendrað varð fyri íverksetaraportalinum í apríl. Portalurin er ein felags inngongd til alla vinnuframaskipanina og til myndugleikar, sum íverksetarum tørvar samband við, og sum stuðla undir íverksetan, menning og nýskapan.

**Vinnupolitikkur og skapandi vinnur**

Umhvørvis- og vinnumálaráðið er farið undir arbeiðið at orða uppskot til nýggjan vinnupolitikk. Dentur verður lagdur á at gera ein vinnupolitikk við greiðum málum og ítøkiligum átøkum.

Á fleiri økjum hevur í mong ár verið tørvur á nýggjum vinnugreinapolitikkum. Hetta er m.a. galdandi fyri kt-vinnupolitikkin, og á hesum økjum eru nýggju tilmælini frá Vakstrarforum kærkomið íkast til vinnupolitikkin. Á øðrum økjum er tíðin komin til at endurskoða ætlanirnar, sum arbeitt hevur verið eftir, og at seta nýggj mál.

Ferðavinnan hevur arbeitt miðvíst eftir málum, ið rukku fram til 2020. Hóast stórar avbjóðingar av koronufarsóttini eru hesi vakstrarmálini nú rokkin, og tíðin er komin at seta nýggj mál. Vakstrarforum hevur valt at gera tilmæli um átøk fyri vinnuferðavinnu. Hetta er millum annað tí, at vinnuferðavinnan bæði er ein tann best lønandi parturin í ferðavinnuni og eisini tann parturin av ferðavinnuni, sum er lættast at skipa, so at hon ikki elvir til óneyðuga stórt trýst og órógv á náttúruna og samfelagið.

Somuleiðis eru flestu málini framd, sum vórðu sett í politikkin fyri skapandi vinnur fyri seks árum síðani. Vit hava m.a. sæð, hvussu væl arbeiðið hjá Filmshúsinum og Tónleikaútflutningsstovuni hava munað og stuðlað undir vøksturin í bæði films- og tónleikavinnuni. Stovnarnir hava skapt nýggj sambond og hava stuðlað skapandi umhvørvunum í teirra luttøku í altjóða framleiðslum. Føroya fólk hava tikið sera væl ímóti hópfíggingarskipanini, og hópfígging er vorðin ein nógv nýttur fíggingarháttur, ikki minst til skapandi vinnurnar.
Nú er politiska uppgávan framhaldandi at taða væl á hesum raðfestu økjunum og at seta nýggj mál fyri vøkstri í fleiri skapandi vinnugreinum.

Vinnupolitikkurin byggi, enn sum áður á somu grundreglur við áherðslu á frælsan marknað undir ábyrgd. Harumframt verður dentur lagdur á støðugar karmar. Almenni leikluturin er í fyrsta lagi at seta hesar karmar og at laga teir til tørvin í dag. Í seinastu vinnupolitikkunum varð stór áherðsla løgd á altjóðagerðina, og hvussu vit kundu menna okkara netverk og tryggja, at vit fingu fulla nyttu og lut í altjóðagerðini. Í dag er heimurin meira samanbundin enn nakrantíð áður upp á gott og ónt. Avbjóðingarnar við umhvørvi og veðurlag kenna ikki landamørk, og kríggið í Ukraina hevur gjørt tað alt ov greitt, hvussu viðbrekið alheims samstarvið er, og hvussu skjótt tað er at bróta niður bæði álit, samhandil og skipanir. Í nýggja vinnupolitikkinum verður áherðsla løgd á tryggan og burðardyggan vøkstur.

# LØGLISTI 2022

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni (Avtøka av Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini, ALS, og Kærunevndini hjá Barsilsskipanini)**
Talan er um fylgilógarbroytingar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni. Endamálið við uppskotinum er at flyta tær heimildir, sum hesar kærunevndir í dag hava, til Kærustovnin. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í Konkurslógini og fylgibroytingar í felagslógum**
Broytingin skal betra møguleikan fyri, at fyritøkur við fyribils fíggjarligum trupulleikum, kunnu rekast víðari heldur enn at verða koyrdar á húsagang. Reglurnar um varnarting verða broyttar, soleiðis at tað ber til at søkja um skuldarumskipan í Føroyum, hóast tú ikki hevur bústað her. Eisini verða fylgibroytingar gjørdar í felagslóggávu. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í sambandi við broyting í Konkurslógini.**
Fylgibroytingar til broyting, sum varð gjørd í Konkurslógini seinastu tingsetu, har reglur um endurskipan og trotabúsbann vóru settar inn. Talan er um fylgibroytingar í yvirtiknari lóggávu. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um dagføring av rættargangslógini**
Nýggj rættargangslóg fyri Føroyar varð sett í gildi 1. januar 2021. Síðan tá eru út við 55 lógarbroytingar gjørdar í rættargangslógini í Danmark, sum ætlanin er at seta inn í rættargangslógina fyri Føroyar. Tørvur er eisini á at gera fylgibroytingar til løgtingslógir, sum Løgtingið hevur samtykt, t.d. foreldramyndugleikalógina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini kap. 1-11**
Føroyskan og dagføring av almenna partinum í revsilógini. Í almenna partinum eru reglur um treytirnar fyri at revsa, so sum aldur á gerningsmanninum, ríkisborgaraskapur, brotsstaður, neyðverja, saknæmi (tilregnelighed), reglur um brotsroynd, meðvirkni og reglur um dømdu revsingina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni (Avtøka av Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvingsilsnevndini)**
Talan er um fylgilógarbroytingar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni. Endamálið við uppskotinum er at flyta tær heimildir, sum hesar nevndir í dag hava, til Kærustovnin. Broytingarnar skulu koma í gildi ávikavist 1. juli 2023 og 1. januar 2024. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um ymiskar broytingar í revsilógini**
Ymiskar broytingar í revsilógini m.a. § 119 a um sjikanu móti almennum starvsfólki, § 216, stk. 2 um kynslig brotsverk móti børnum, § 242 um tráfylging, § 243 um sálarligan harðskap, § 244, stk. 2 um harðskap, § 264 e um samleikastuldur, § 299 c viðv. broti á kappingarlóggávuna. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um vápn (Vápnalógin)**
Vápnalógin er frá 1967 og bert fáar broytingar eru gjørdar síðan tá. Tørvur er á at dagføra lóggávuna og ein nýggj vápnalóg verður gjørd. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um vaktarvirksemi o.a.**
Nýggj lóggáva um vaktarhald. Skotið verður upp, at tann, sum bjóðar fram vaktarhald, skal hava loyvi frá Loyvisnevndini, og at tann, sum skal virka sum vakt, eisini skal hava góðkenning frá Loyvisnevndini. Hetta líkist skipanini, sum er fyri duravørðar í matstovulógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um brúkaraavtalur**
Nýggj løgtingslóg um brúkaraavtalur, sum verjir brúkaran betur m.a. við avtalum, sum verða gjørdar uttan fyri handilsstaðið hjá tí vinnurekandi og við fjarsølu, t.d. nethandli. Rætturin at angra verður betraður, og reglurnar verða greiðari. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um summartíð og broyting í Lov for Færøerne om Tidens Bestemmelse.**
Løgtingslóg um summartíð kom á vári 1980. Ætlanin er at fara til eina varandi summartíð, sum er GMT +1, sum eisini verður galdandi um veturin. Hetta merkir, at tað, sum vit í dag kenna sum vetrartíð, fer í søguna. Við hesi broyting fara vit at hava somu tíð sum evropeiska meginlandið um veturin, men verða ein tíma aftanfyri tey um summarið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av farsóttarøkinum)**
Koronafarsóttin hevur víst, at tað hevur avbjóðingar við sær, at farsóttarlóggávan er á donskum hondum. Arbeitt verður í løtuni saman við donskum myndugleikum um at yvirtaka farsóttarmálsøkið. Ætlanin er at leggja lógaruppskot um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum fyri tingið á ólavsøku.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Skattir, avgøld o.a.*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kapitalvinningsskattalógini**
Føroyska kapitalvinningsskattalógin hevur ikki undantøk fyri afturkeyp av egnum partabrøvum og tí verður hetta at rokna sum vinningsbýti. Tað merkir, at um eitt felag á aðalfundi tekur avgerð um at lækka partapeningin við at strika egin partabrøv, og tey eru keypt undir einum skipaðum afturkeypi,

so skal vinningsbýtisskattur rindast av avhendingarupphæddini. § 15 “Skattur skal eisini haldast aftur í sambandi við, at felag keypir egin partabørv o.a., fevnd av § 5 í hesi lóg”.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í skattalógini**
Skattalógin hevur ikki ásetingar um gjaldfreist við atliti at sonevndum MAP-málum (Mutual Agreement Procedure). Føroyar hava umvegis limaskapin í IF BEPS (Base Erosion and Profit Shifting) bundið seg til at virka í samsvari við fýra minimumskrøv. BEPS-átak nr. 14 er eitt av hesum minimumskrøvum, og snýr seg ítøkiliga um sínámillum avtalur tvørtur um landamørk.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í meirvirðisgjaldslógini**
Ymiskar dagføringar í mvg-lógini. Átak 8 í veðurlagspolitikkinum, mvg-afturbering til el- og vetnisbilar, heldur fram til ársenda 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti**
Dagføra orðingarnar í § 1, stk. 2 og § 8, stk. 2, sum snúgva seg um eftirlønargjald av uttanlandsinntøkum og FAS-inntøkum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í tonsaskattalógini**
Ætlanin er at herða krøvini í § 1, soleiðis at ásetingin verður í samsvari við BEPS-átak nr. 5, sum snýr seg um at handfara skattsiðvenjur meira virkið við atliti at gjøgnumskygni og innihaldi. BEPS-átak nr. 5 er somuleiðis eitt av teimum fýra minimumskrøvunum, sum Føroyar umvegis limaskapin í IF BEPS hava bundið seg til at dagføra.

**Lógaruppskot sum avleiðing av nýggjari skattafyristingarlóg**
Løgtingið samtykti fyrr í ár eina nýggja skattafyristingarlóg. Nýggja lógin hevur fleiri broytingar við sær. Eitt nú verða kommunalu skattakærunevndirnar tiknar av, og Toll- og Skattaráðið er avtikið. Nýggjar freistir, ið viðvíkja tolli, meirvirðisgjaldi, lønarhæddaravgjaldi og øðrum avgjaldi, eru ásettar, og møguleikin fyri at gera frávik frá freistini at broyta skattaálíkning er víðkaður. Neyðugt er at gera fleiri broytingar í aðrari lóggávu sum avleiðing av hesum broytingum:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattafría samanlegging
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum (Rentutryggingarlógin)

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í avskrivingarlógini**
Galdandi avskrivingarlóg er frá 1971, og seinasta broytingin varð gjørd í 2001. Tørvur er á ymiskum dagføringum. Verandi lóg hevur ongar ásetingar um avskrivingar av t.d. vindmyllum og størri samferðsluverkætlanum. Ynski er eisini um greiðari ásetingar um bygningar, ið verða nýttir til Airbnb, eins og tørvur er á at endurskoða treytirnar um, at ein íbúðarbygningur skal hava minst 10 íbúðareindir.

**Uppskot til løgtingslóg um skattaeftirlit**
Ætlanin er, at Taks skal fáa eina generella heimild um atgongd til viðkomandi almennar skipanir sum liður í arbeiðinum at nútímansgera skattaeftirlitið. Heimildirnar verða saman við verandi revsiheimildum savnaðar í eini lóg um skatteeftirlit. Heildarásetingar fyri renturokningar, avrundingar, innheintingarheimildir, ómaksgjøld o.a. verða somuleiðis dagførdar og ásettar í hesi lóg.

*Samferðsla*

**Uppskot til Løgtingslóg um at fyrireika ein suðuroyartunnil**
Ætlanin við lógaruppskotinum er at fyrireika verkætlanina suðuroyartunnil. Higartil eru forkanningar gjørdar og innleiðandi váðametingar gjørdar. Lógaruppskotið skal geva heimild til eitt forprojekt, har millum annað linjuføringin skal leggjast og nærri váðametingar gerast. Tá ið hetta er gjørt, kann málið leggjast aftur til politiska støðutakan. Verður avgjørt at halda fram, kann eitt endaligt høvuðsprosjekt gerast. Tá ið hetta er gjørt, kann tað bjóðast út, og fíggingarmøguleikar kunnu kannast.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í landsvegalógini**
Ætlanin er at gera dagføringar í landsvegalógini viðvíkjandi landsvegum, sum gerast kommunalir, ferðslutrygd á kommunalum vegum, greiðari heimild fyri Sóljuleiðum, og hvussu landið kann avhenda tunlar og havnir, sum landið ikki longur hevur brúk fyri.

**Uppskot til løgtingslóg um Strandferðsluna**
Ein arbeiðsbólkur hevur latið landsstýrismanninum nøkur tilmæli um at umskipa Strandferðsluna. Í fíggjarlógini fyri 2022 er peningur settur av at stovna eitt partafelag at leggja virksemið í. Ætlanin er, at Strandferðslan verður skipað sum sjálvstøðug eind, tað veri seg partafelag ella sjálvstøðugur stovnur.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
Ætlanin er at víðka verandi áseting í ferðslulógini um nýtslu av fartelefon til eisini at fevna um onnur handhildin samskiftistól, umframt møguliga at herða revsingina fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum. Ætlanin er eisini at gera møguligar aðrar dagføringar.

*Talgilding*

**Uppskot til løgtingslóg um almenna postkassa**
Endamálið við lógaruppskotum er at tryggja, at talgildur postur frá almennum stovnum hevur sama rættarvirknað sum vanligur postur. Eisini skulu almennir stovnar senda allan talgildan post umvegis almennu skipanina "Mín boks".

**Uppskot um verklagslóg fyri Talgildu Føroyar 2023 til 2025**
Vakstrarforum hevur mælt til átøk, sum kunnu skapa vøkstur í KT-vinnuni. Føroyar kunnu skapa serstakar KT-loysnir í Føroyum og nýta heimamarknaðin sum lopfjøl til útflutning. Fleiri av átøkunum kunnu við fyrimuni skipast í Talgildu Føroyum, sum bæði hevur royndirnar og fólkini at fremja hesa ætlan.

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2023**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýrismaðurin fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2024-2028**
Landsstýrismaðurin leggur fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
Sum liður í eftirmeting av játtanarskipanini verða ymiskar dagføringar og broytingar gjørdar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a.**
Sum liður í eftirmeting av roknskaparverkinum verða onkrar dagføringar og broytingar gjørdar. M.a. hevur OECD gjørt eina yvirskipaða greining av roknskaparverkinum og hevði nøkur tilmæli.

*Kommunal fíggjarmál o.t.*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kommunustýrislógini**
Ætlanin er at broyta ásetingina um skuldarmarkið hjá kommunum, soleiðis at tað í størri mun tekur støði í samlaðu inntøkunum hjá kommunum. Tað vil siga, at inntøkurnar, sum kommunurnar fáa í eftirlønarskatti og afturbering vegna frádráttir, skulu takast við.

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi**
Tillagingar verða gjørdar í lógini um brúksskyldu á veiðirættindum í sambandi við, at brúksskyldan verður nærri viðgjørd í 2022. Møguligar tillagingar verða eisini gjørdar um, hvussu umlagdar menningarkvotur skulu teljast við í miðsavningarregluni fyri uppsjóvarfiskasløg. Harumframt er ætlanin at leingja gildistíðina á veiðiloyvum við einum ári, so tey eru galdandi til 1. januar í 2035. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur í hyggju at fremja**
Sambært sjófeingislógini leggur landsstýrismaðurin, áðrenn 20. februar á hvørjum ári, fyri Løgtingið frágreiðing um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om ændring af lov om tvang i psykiatrien"**
Arbeitt verður við at dagføra lóg um tvingsil í psykiatriini. Uppskot er komið frá Sundhedsministeriet í Danmark, sum skal lagast til føroysk viðurskifti. Millum annað skulu broytingarnar tryggja sjúklingunum størri rættindi, t.d. við at rættarstøðan hjá teimum undir 15 ár verður ásett í lógini, samstundis sum reglurnar fyri nær loyvt er at nýta tvingsil, verða herdar.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov um ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet"**
Anordning om ikrafttræden for Færøerne om ændring af lov om klage og erstatningsadgang varð samtykt í desember 2020. Síðan tá hevur Hægsti Rættur avsagt ein dóm, ið hevur ført við sær, at neyðugt er at broyta lógina. Uppskot til broyting varð lagt fram í Fólkatinginum í mars 2022. Patienterstatningen hevur heitt á Heilsumálráðið um at arbeiða fyri, at somu broytingar verða gjørdar í føroysku lóggávuni.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gransking í mannaílegum**
Ílegulógin kom í gildi í 2005. Lógin hevur 17 ár á baki og verður í løtuni endurskoðað. Arbeitt varð í 2015 við at gera broytingar í lógini, tá ið arbeiðsbólkur varð settur at skriva um "útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum". Harumframt er onnur lóggáva sett í gildi, sum krevur broytingar í ílegulógini, t.d. í "Sundhedsloven" og "Komitéloven".

**Uppskot til løgtingslóg um tatovering**
Galdandi lóg um tatoveringar er frá 1966. Tað hevur sostatt stóran týdning at fáa eina nýggja og tíðarhóskandi lóg á økinum, sum eitt nú setir krøv til litirnar og útgerðina, ið verða brúkt, eins og tað verður nágreinað, hvør ið hevur loyvi til at gera kosmetiskar tatoveringar.

**Uppskot til løgtingslóg um rehabilitering**
Ein arbeiðsbólkur arbeiðir í løtuni við at kanna, hvørjar avbjóðingar eru á rehabiliteringsøkinum í dag, og hvørt hesar avbjóðingar kunnu loysast við lóggávu ella á annan hátt. Tískil verður møguliga neyðugt at gera lógarbroytingar í lóggávuni viðvíkjandi endurvenjing.

**Uppskot til løgtingslóg um játtan frá Novo Nordisk Fonden**
Í næstum verður avtala gjørd millum Føroyar og Novo Nordisk Fonden um samstarv um átøk viðvíkjandi diabetes og øðrum endokrinologiskum sjúkum. Novo Nordisk Fonden letur eina játtan til hetta samstarv. Neyðugt er at fáa undirtøku frá Løgtinginum fyri at taka við játtanini frá Novo Nordisk Fonden. Eitt lógaruppskot verður lagt fyri tingið á ólavsøku 2022 um heimild at taka við játtanini.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum)**
Arbeitt verður í løtuni saman við donskum myndugleikum um at yvirtaka farsóttarmálsøkið. Í sambandi við sjálva yvirtøkulógina er neyðugt at tilevna serligt lógaruppskot um myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum. Ætlanin er at leggja lógaruppskot um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum fyri tingið á ólavsøku.

**Uppskot til løgtingslóg um at dagføra starvsfólkabygningin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi**
Starvsfólkabygningurin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi skal dagførast. Fyrireikingar eru farnar í gongd. Tá ið fyrisitingin á Klaksvíkar sjúkrahúsi er flutt í Gulu húsini, ber til at fara undir arbeiðið. Fyrsta stigið er at arbeiða við hugskotum til loysnir. Tá ið prosjekteringin er liðug, kann tað tilfarið verða brúkt sum grundarlag fyri nýggjari verklagslóg at leggja fyri Løgtingið.

## UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni**
Endamálið við lógarbroytingini er at útvega heimild til, at nevndir, átøkar kirkjuráðum, kunnu verða skipaðar at stuðla serprestum í virkseminum. Ætlanin er at seta studentaprest og diakonprest í næstum. Manningin verður ætlandi umboð fyri brúkaraáhugamál og fólk við hollum royndum úr kirkjuráðsarbeiði. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om anmeldelse af fødsler og dødsfald**
Endamálið við lógarbroytingini er at dagføra ásetingarnar um heimildir og skyldur, soleiðis at tær leggja betur upp fyri teimum fyrisitingarligu møguleikum og mannagongdum, sum nú eru, at taka burtur mismun, og yvirhøvur at leggja betur upp fyri, hvussu familjulívið í dag er skipað. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til orðaskifti um public service-sáttmálan**
Sambært løgtingslóg um kringvarp verður landsstýrismanninum heimilað at gera public service-sáttmála við Kringvarp Føroya. Áðrenn public service-sáttmáli verður undirskrivaður, skal Løgtingið sambært § 11, stk. 2 í kringvarpslógini fáa høvi at umrøða ætlaða innihaldið í sáttmálanum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um listprýði av almennum bygningum**
Endamálið við løgtingslógini er at skipa listprýðing av almennum bygningum, so at listprýðing og byggilist verður hugsað sum ein heild, og at ein partur av byggikostnaðinum verður settur av til list frá byrjan av verkætlanini. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í januar 2023.

**Uppskot til løgtingslóg um bókasøvn**
Bókasavnslógin verður dagførd, so at lóggávan leggur upp fyri stóru broytingarnar, sum eru farnar fram í samfelagnum síðani aldarskiftið, og sum seta alt størri krøv til bókasavnstænastur, ikki minst á útbúgvingarøkinum, á samskiftisøkinum og á tøkniliga økinum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skjalasøvn (økisskjalasøvn)**
Við broytingini í løgtingslóg um skjalasøvn verður lagt upp til, at økisskjalasøvn kunnu verða sett á stovn kring landið. Endamálið er at varðveita skjalasavnindi, ið hava týdning fyri staðbundna søgu, í nærumhvørvinum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Fólkaskúlalógin verður dagførd sambært arbeiðinum hjá nevndini, sum er sett at endurskoða fólkaskúlalógina. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.**
Lóg um frítíðarundirvísing skal dagførast, millum annað við atliti at kørmunum kring undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**
Møguliga má lógin um Studna endurskoðast, um møguleiki skal vera hjá t.d. tilflytarum at fáa lestrarstudning, áðrenn tey hava búð í Føroyum í tvey ár. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya**
Lógarverkið kring Fróðskaparsetur Føroya verður dagført millum annað við atliti at sernámsfrøði og skilhaldsreglum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um Hægri Nám**
Lógarkarmur eigur at fáast til vegar fyri útbúgvingum á Hægri Námi, sum liggja millum miðnám og bachelor-útbúgvingar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til fólkaháskúlar**
Dagføra lóg um studning til fólkaháskúlar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at um- og útbyggja eftirskúlan Rásina**
Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður umbygdur og útbygdur. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um heimild til at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús**
Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík**
Løgtingið hevur hækkað stuðulin til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík. Neyðugt verður tí at broyta løgtingslógina um studningslán til byggingina, tí stuðulsupphæddin verður størri enn ásett er í lógini. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til samtyktar um trygdarpolitisku mál Føroya**
Kríggið í Ukraina skilamarkar eitt nýtt trygdarpolitiskt tíðarskeið. Í hesum samanhangi er umráðandi, at Føroyar eru tilvitaðar um trygdar- og verjupolitikk, og eru sinnaðar at gera sítt fyri at trygd og støðufesti valda. Landsstýrið raðfestir økið, og skal vera við í øllum avgerðum, tilgongdum og ætlanum, sum hava týdning fyri trygd og verju í Norðuratlantshavi og í Arktis. Ætlanin er at leggja uppskot til samtyktar um trygdarpolitisku mál Føroya, fyri tingið í heyst.

## ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Oljuískoyti til húski)**
Hækkingin í prístalinum hevur verið óvanliga stór í 1. og 2. ársfjórðingi í 2022. Landsstýrið ynskir at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum. Ætlanin við uppskotinum er at veita fíggjarligan stuðul til húski við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, og sum brúka olju til upphiting av bústaðnum. Ítøkiliga er ætlanin at lata eitt ískoyti á 7.000 kr. Uppskotið verður lagt fyri tingið fyrst í september.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir**
Arbeiðsmegin verður alsamt meira flytfør, og tí er tørvur á at fáa greiðari reglur um innvinnan av rætti til almannapensjón og at fáa greiðari reglur um, hvørjar pensjónsveitingar kunnu veitast til pensjónistar, sum fáa føroyska brotpensjón í útlondum. Eisini er ætlanin at gera tað umsitingarliga lættari fyri borgaran at um- og eftirrokna almannapensjón.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m**
Fyri smærri vinnurekandi við starvsmonnum í starvi er tað ein fíggjarligur smeitur, tá ið starvsmaður verður raktur av langtíðarsjúku. Tí verður løgtingslógin dagførd soleiðis, at smærri privatir arbeiðsgevarar verða fevndir av dagpeningaskipanini.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt**
Kommunurnar skulu sambært § 19 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. hava eftirlit við teimum tænastum, sum tær veita borgarunum. Eftirmetingin av eldraøkinum vísir, at kommunurnar einki eftirlit hava framt, síðani økið varð lagt til kommunurnar at umsita. Skal eftirlitið fáast at rigga, er allarhelst neyðugt við lógarbroyting.

**Uppskot til løgtingslóg um brekumboð**
Ætlanin er at gera reglur um eitt brekumboð, sum skal kunna virka óheft og hava eftirlit við, at breksáttmálin verður settur í verk í Føroyum. Harumframt er ætlanin, at brekumboðið eisini skal hava ein upplýsandi leiklut um rættindi hjá fólki, ið bera brek.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Ætlanin er at endurskoða og dagføra barnaverndarlógina við tí í hyggju at bøta um ávís viðurskifti til tess at tryggja børnum og familjum betri kor, m.a. viðvíkjandi rættinum til ókeypis umboðan, fosturforeldraskipanini og tíðarfreistir í samband við kanningar, tá ið myndugleikarnir stúra um barnið.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn**
Ætlanin er at endurskoða og dagføra javnstøðulógina til tess at tryggja greiðari ásetingar viðvíkjandi heimildinum hjá Javnstøðunevndini.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
Sum ásett í samgonguskjalinum verður arbeitt við at broyta dagstovnalógina, so heimilað verður kommununum at rinda part av kostnaðinum fyri stovnspláss til foreldur, um tey velja at ansa egnum børnum heima.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Havn til børn og ung við autismu**
Vegna hækkandi prís og einstakar manglar í uppruna-prosjektinum er kostnaðarmetingin at byggja bú- og umlættingarheim í Kvíggjartúni á Argjum til børn og ung við autismu hægri, enn verklagslógin heimilar, og tí fer landsstýrismaðurin at biðja um størri játtan.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja ein vardan bústað til fólk við autismu**
Ætlanin er at byggja nýtt sambýli til vaksin fólk við autismu.

**Uppskot til broytingar í løgtingslóg um útleigan av bústøðum (Leigulógin)**
Leigumarknaðurin er broyttur munandi, síðan Leigulógin upprunaliga varð gjørd, og orsakað av hesum er tørvur á, at lógin verður dagførd.

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ársroknskap**
Endamálið er at dagføra lógina samsvarandi lóggávuni í grannalondunum. Tað snýr um eina røð av broytingum, m.a. í sambandi við virðisásetingar, leiðslufrágreiðingar, at lata ársfrásøgn á enskum, ónoteraðar kapitalpartar, avskriving av goodwill v.m. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping**
Við nýggju lógini verður arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið greiðari lýst. Ómaksgjøld fyri samanleggingar verða innførd, revsiásetingarnar fyri kartellvirksemi verða herdar, og leniency-reglur verða ásettar. Lógarviðmerkingarnar verða endurskoðaðar umframt smærri rættingar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti**
Broytingarnar fevna um panting av frekvensgjøldum, innsavnan av upplýsingum, mastraregulering, kunningartrygd, nummaróheftar sínámillum samskiftistænastur (NUIK-tænastur) og innlit. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging**
Talan er um eina generella dagføring av tryggingarlógini, undir hesum áseting av reglum um kravt talgilt samskifti og varskógvaraskipan v.m. Sambært uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Tryggingareftirlitinum skal vera talgilt. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um integratión**
Integratiónslógin hevur til endamáls at skapa karmar um rættindi og skyldur hjá útlendingum, ið koma til Føroya. Somuleiðis verða treytirnar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi tillagaðar, so útlendingur, ið vil hava varandi uppihaldsloyvi, skal hava lokið skeið í føroyskum sum fremmandamáli og samfelagsviðurskiftum. Hetta er fyrsta stig í einum betur skipaðum føroyskum integrasjónspolitikki. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skipasmiðjustuðul**
Endamálið við lógarbroytingini er at fáa neyvari ásetingar um, nær stuðul kann veitast, og hvussu stórur partur av arbeiðinum skal gerast í Føroyum, fyri at stuðul kann veitast. Somuleiðis skal stuðulsupphæddin møguliga endurskoðast og nýggj serskipan til grønar orkuloysnir mennast. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroyska altjóða skipaskrá**
Shipping-vinnan er ein týðandi partur av føroyska vinnulívinum. Tað hevur tí stóran týdning, at shipping-vinnan hevur tryggar og kappingarførar karmar at arbeiða undir. FAS-lógin verður endurskoðað m.a. við krøvum til eigarar og umboðsfólk. Nágreinað verður, hvørji skip kunnu koma undir FAS, eins og strikingarásetingarnar verða endurskoðaðar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um gagnnýtslu av vatni úr undirgrundini**
Endamálið við lógini er at tryggja burðardygga nýtslu og hartil knýttu verndina av vatninum í undirgrundini í Føroyum. Landsstýrismanninum verður heimilað at veita loyvi til at gagnnýta tað vatn, ið rennur í ella kann vinnast burtur úr føroysku undirgrundini. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing**
Stýrið fyri ALS evnar í løtuni til uppskot um broytingar í galdandi løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. Broytingaruppskotini eru fyri tað mesta av tøkniligum slagi. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um manning av skipum**
Manningarlógin varð seinast broytt í 2015, og tørvur er á at nágreina og laga til í mun til aðrar lógarbroytingar, sum eru hendar á sjóvinnuøkinum. Talan er um nógvar smærri broytingar, m.a. kunnu nevnast greiðari ásetingar um førleikaprógv, krøv til radiopassarar og krøv til skipskokkar. Nýggj kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum verður eisini gjørd. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum**
Tað eru fleiri ár síðan broytingar vórðu gjørdar í lógini, sum treingir til at verða dagførd. Talið á alibátum er nógv vaksið seinastu árini, og sýnini hjá sjóvinnumyndugleikanum eru økt. Neyðugt verður at gera sýnini umsitingarliga effektiv. Heimildirnar at taka gjald fyri sýn verða endurskoðaðar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)**
Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan fyri karmarnar av FATF (Finansial Action Task Force) og eru limur í Global Forum, sum regluliga ger eftirlit í limalondunum. Føroyar hava sostatt skyldu til at tryggja, at hvítvasklóggávan er tíðarhóskandi. Við uppskotinum verður lógin dagførd samsvarandi 4. og 5. hvítvaskdirektivinum hjá ES. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven**
Uppskotið snýr seg um at seta í gildi ávísar Schengen-reglur um at ferðast inn og út úr Schengenøki. Talan er um eina nýggja skipan, sum væntandi kemur í gildi í londunum í Schengen ultimo november 2022. Um ferðandi til og úr Føroyum skulu verða fevnd av somu reglum er neyðugt, at Schengenreglurnar verða settar í gildi í Føroyum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í landbúnaðarlóggávu**
Í samljóði við samgonguskjalið er farið undir at orða ein landbúnaðarpolitikk við serligum denti á burðardygt lendisbrúk, djóravælferð, útbúgving og fígging. Neyðugt verður helst við lógarbroytingum, herundir tillagingum í løgtingslóg um landsjørð og í løgtingslóg um Búnaðargrunn. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Frágreiðing til løgtingið um havbit av laksi**
Løgtingið hevur heitt á Føroya landsstýri (løgtingsmál nr. 128/2017) um at seta niður bólk av serfrøðingum til at kanna og gera frágreiðing um, hvussu Føroyar kunnu gera seg galdandi við havbiti við laksi, og grundað á frágreiðingina leggja fyri Løgtingið frágreiðing um hetta. Frágreiðingin verður væntandi latin Løgtinginum í oktober 2022.

**Uppskot til løgtingslóg um gongd í haga**
Uppskotið hevur sum mál, at føroyingar, eins og siðvenja hevur verið, skulu hava møguleika at njóta føroysku náttúruna. Talan verður um rættindi, sum eiga at verða útint undir skipaðum viðurskiftum, soleiðis at talan gerst um javnvág millum áhugamálini hjá jarðareigarum, ferðavinnu og borgarum. Eftir bygda- og varðagøtum kunnu øll ganga, meðan tað í haga verður skilt millum privata gongd í haga og vinnuliga gongd í haga. Dentur verður lagdur á at tryggja, at øll gongd fer fram við neyðugum varsemi og við atliti til náttúruna, seyðahald og landbúnað.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin)**
Við støði í semju um elorkuøkið verður lógargrundarlagið dagført, soleiðis at lóggávan skilir greiðari millum kappingarútsett virksemi og so netvirksemi og skipanarberandi tænastur, sum natúrligari hoyra til monopolvirksemið hjá netfelagnum. Ætlandi verða eisini ásettar reglur um fjarhita í elveitingarlógini. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
Býarskipanarlógin er frá 1954 og treingir til dagføring, m.a. fyri at leggja upp fyri hugtakinum burðardygg býarmenning. Tøtt bústaðarbygging, elektrifisering av samfelagnum, ynski um frílendi og frítíðarhús og atlit at larmi og øðrum vansum av vinnu- og havnaøkjum seta øðrvísi krøv til kommunala byggimyndugleikan um tilrættislegging av framtíðar býarskipan. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um fólkayvirlit**
Endamálið er at lætta um talgilt samskifti millum føroyingar, sum búgva uttanlands, og føroyskar myndugleikar. Tørvurin á at knýta samband millum p-tal og CPR-nummar er støðugt vaksandi. Fleiri almennir stovnar hava í samband við málsviðgerð tørv á, at p-talið og CPR-nummarið verða knýtt saman. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um pant av íløtum**
Nýggj lóg um pant av íløtum skal gera pantskipanina einfaldari og kundavinarligari. Harumframt skal lógin geva heimild til at panta íløt til fleiri sløg av úrdráttum, enn galdandi lóg loyvir, tí rákið er, at meira tilfar frá einnýtsluíløtum skal fáast inn aftur til endurvinning heldur enn at brennast ella tyrvast. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslógir, sum stuðla undir orku- og veðurlagspolitikkin**
Uppskotið til samtyktar um orku- og veðurlagspolitikk, løgtingsmál 130/2021, áleggur í tíðarfestari ætlan landsstýrinum at avmarka útlátið av vakstrarhúsgassum. Nøkur av hesum átøkum mugu fremjast við løgtingslóg. Tingárið 2022/23 verður m.a. elveitingarlógin dagførd, ásettar verða reglur um bann av oljufýrum í nýggjum húsum, stuðul til at taka niður gomul oljufýr og útfasing av sonevndu F-gassunum.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum 1. jan., 1985 – 2022 .......... 74
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 – 2021 .......... 74
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, jan. 2007 – mai 2022 .......... 74
**Mynd 4:** Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld (árstíðarjavnað), jan. 2000 – apr. 2022 .......... 75
**Mynd 5:** Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2022 .......... 75
**Mynd 6:** Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2022 .......... 75
**Mynd 7:** Lønargjaldingar 12 mðr. rullandi, des. 1985 – juni 2022 .......... 76
**Mynd 8:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998 – 2020 .......... 76
**Mynd 9:** Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 – 2. ársfj. 2022 .......... 76
**Mynd 10:** Tøka av laksi og sílum, 1996 – 2021 .......... 77
**Mynd 11:** Innflutningur og útflutningur, 1988 – 2021 .......... 77
**Mynd 12:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, 12 mðr. rullandi, jan. 1998 – mai 2022 .......... 77
**Mynd 13:** Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, 1998 – 2020 .......... 78
**Mynd 14:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 – juni 2022 .......... 78
**Mynd 15:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, jan. 2006 – juni 2022 .......... 78
**Mynd 16:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 – juni 2022 .......... 79
**Mynd 17:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 – juni 2022 .......... 79
**Mynd 18:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 – juni 2022 .......... 79
**Mynd 19:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 – juni 2022 .......... 80
**Mynd 20:** Rakstrarvðurskifti gjaldsjavnans, 1998 – 2021 .......... 80

Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum 1. jan., 1985 – 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 – 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, jan. 2007 – mai 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4: Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld (árstíðarjavnað), jan. 2000 – apr. 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 5: Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 6: Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 7: Lønargjaldingar 12 mðr. rullandi, des. 1985 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 8: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998 – 2020




* Tølini fyri 2020 eru fyribils uppgerð.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 9: Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 – 2. ársfj. 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 10: Tøka av laksi og sílum, 1996 – 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 11: Innflutningur og útflutningur, 1988 – 2021




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 12: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, 12 mðr. rullandi, jan. 1998 – mai 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd: 13: Rakstrarvðurskifti gjaldsjavnans, 1998 – 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 14: Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, 1998 – 2020




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 15: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 16: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, jan. 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 17: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 18: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd 19: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.

Mynd: 20: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 – juni 2022




Kelda: Hagstovan.